sev

# Ársfrágreiðing og ársroknskapur 2023

www.sev.fo

*Slóðbrótandi tøkni tryggjar hægri úrtøku úr vindmegi*

# Innihaldsyvirlit



| | |
|---|---|
| Leiðsluátekning | 3 |
| Átekning frá óheftum grannskoðara | 4 |
| Høvuðs- og lyklatøl | 6 |
| Leiðslufrágreiðing | 7 |
| Stutt um 2023 | 21 |
| Framleiðsla í 2023 | 29 |
| Grøn fígging | 30 |
| Starvsfólkahópurin | 32 |
| ESG-lyklatøl | 37 |
| Heilsa, trygd og umhvørvi | 38 |
| Váðaviðurskifti | 47 |
| Nýttur roknskaparháttur | 53 |
| Rakstrarroknskapur 1. januar – 31. desember | 59 |
| Fíggjarstøða 31. desember | 60 |
| Eginognaruppgerð | 62 |
| Peningastreymsuppgerð | 64 |
| Notur | 65 |
| Virkisbýti, framleiðsla og net | 75 |
| Rakstrarbýti, framleiðsla og net | 88 |

**Sev**
Landavegur 92
Postboks 319
FO-110 Tórshavn

+298 34 68 00
sev@sev.fo
www.sev.fo

Roknskaparár: 01.01-31.12
V-tal: 331538

# Leiðsluátekning

Nevndin og stjórnin hava í dag lagt fram ársfrásøgnina fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2023 hjá Elfelagnum Sev samtakinum.

Ársfrásøgnin er gjørd í samsvari við ársroknskaparlógina.

Tað er okkara fatan, at nýtti roknskaparhátturin er hóskandi, og at samtaks- og ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av samtaksins og móðurfelagsins ognum, skyldum og fíggjarligu støðu pr. 31. desember 2023 og av úrslitinum av virksemi samtaksins og móðurfelagsins og av peningastreyminum hjá samtakinum fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2023.

Leiðslufrágreiðingin rúmar, eftir okkara fatan, eina rættvísandi frágreiðing um tey viðurskifti, sum frágreiðingin umrøður.

Tórshavn, hin 3. apríl 2024

## Stjórn

**Hákun Djurhuus**
Stjóri

## Fíggjarleiðsla

**Bogi Bendtsen**
Deildarstjóri fyri fyrisiting

## Nevnd

**Kári Johansen**
Formaður

**Haraldur S. Hammer**
Næstformaður

**Oddmar á Lakjuni**

**Niclas Hentze**

**Poul Klementsen**

**Sonni L. Petersen**

**Sune Jacobsen**

# Átekning frá óheftum grannskoðara

**Til kapitaleigararnar í Elfelagnum Sev**

**Niðurstøða**
Vit hava grannskoðað konsernroknskapin og ársroknskapin hjá Elfelagnum Sev fyri roknskaparárið 1. januar – 31. desember 2023 við nýttum roknskaparhátti, rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu, eginognaruppgerð, pengastreymsuppgerð og notum. Konsernroknskapurin og ársroknskapurin eru gjørdir eftir ársroknskaparlógini.

Tað er okkara fatan, at konsernroknskapurin og ársroknskapurin geva eina rættvísandi mynd av ognum, skyldum og fíggjarligu støðu pr. 31. desember 2023 og av úrslitinum av virksemi hjá konsernini og felagnum í roknskaparárinum 1. januar – 31. desember 2023 samsvarandi ársroknskaparlógini.

**Grundarlag fyri niðurstøðuni**
Grannskoðanin er løgd til rættis í samsvari við altjóða standardir um grannskoðan og aðrar ásetingar, sum eru galdandi í Føroyum. Okkara ábyrgd eftir hesum standardum og ásetingum er nærri greidd frá í niðanfyri standandi broti “Ábyrgd grannskoðarans av at grannskoða konsernroknskapin og ársroknskapin”. Vit eru óheft av konsernini samsvarandi altjóða reglunum hjá International Ethics Standards Board for Accountants’ um etiskan atburð hjá grannskoðarum (IESBA Code) og øðrum etiskum krøvum, sum eru galdandi í Føroyum. Vit hava eisini hildið hinar etisku skyldurnar, sum ásettar eru í hesum krøvum og IESBA Code. Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kunnu vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

**Ábyrgd leiðslunnar av konsernroknskapinum og ársroknskapinum**
Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein konsernroknskap og ársroknskap, ið geva eina rættvísandi mynd í samsvari við ársroknskaparlógina. Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av tí innanhýsis eftirliti, ið leiðslan metir skal til, fyri at konsernroknskapurin og ársroknskapurin kunnu gerast uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

Tá konsernroknskapurin og ársroknskapurin verður gjørdur, hevur leiðslan ábyrgdina av at meta, um konsernin og felagið megna at halda fram við rakstrinum; at upplýsa um viðurskifti viðvíkjandi framhaldandi rakstri, har tað er viðkomandi; umframt at gera konsernroknskapin og ársroknskapin eftir roknskaparmeginregluni um framhaldandi rakstur, uttan so at leiðslan hevur í hyggju at avtaka konsernina ella felagið, steðga rakstrinum, ella at leiðslan í roynd veru ikki hevur annan møguleika enn at gera tað.

**Ábyrgd grannskoðarans av at grannskoða konsernroknskapin og ársroknskapin**
Okkara endamál er at fáa grundaða vissu fyri, at konsernroknskapurin og ársroknskapurin í síni heild ikki hava týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, og at geva eina grannskoðanarátekning við eini niðurstøðu. Grundað vissa er vissa við høgum stigi, men er ikki full trygd fyri, at ein grannskoðan, sum verður gjørd eftir ásetingunum í altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, altíð kann avdúka týðandi skeivleikar, tá slíkir eru. Skeivleikar kunnu koma fyri orsakað av sviki ella mistøkum og kunnu metast at vera týðandi, um tað kann væntast, at teir hvør sær ella saman ávirka fíggjarligu avgerðirnar, sum roknskaparbrúkararnir taka við støði í konsernroknskapinum og ársroknskapinum.

Sum ein liður í grannskoðanini, ið verður gjørd eftir altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, gera vit

yrkisligar metingar og hava eitt yrkisligt ivingarsemi undir grannskoðanini. Har vit eisini:

- Eyðmerkja og meta um váðar fyri týðandi skeivleikum í konsernroknskapinum og ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, leggja til rættis og gera tey grannskoðanararbeiðir, sum hesir váðar krevja, umframt fáa til vega tey grannskoðanarprógv, sum eru nøktandi at vera grundarlag undir okkara niðurstøðu. Váðin fyri ikki at varnast týðandi skeivleikar, sum standast av sviki, er størri, enn tá talan er um týðandi skeivleikar, sum standast av mistøkum, tí svik kann vera av samanløgdum ráðum, skjalafalsan, tilætlaðari burturúrlegging, villleiðingum ella við at skúgva innanhýsis eftirlitið til viks.

- Fáa eina fatan av innanhýsis eftirlitinum, sum er viðkomandi fyri grannskoðanina, fyri at kunna leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum, men ikki fyri at kunna gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum.

- Taka støðu til um roknskaparhátturin, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, og um tær roknskaparligu metingarnar og tilhoyrandi upplýsingar, sum leiðslan hevur gjørt, eru rímiligar.

- Gera niðurstøðu um, um tað er hóskandi, at leiðslan hevur gjørt konsernroknskapin og ársroknskapin við støði í roknskaparmeginregluni um framhaldandi rakstur, umframt um tað við støði í teimum grannskoðanarprógvum, sum eru fingin til vega, er týðandi óvissa um hendingar og viðurskifti, sum kunnu viðføra týðandi iva, um konsernin og felagið megna at halda fram við rakstrinum. Um okkara niðurstøða er, at tað er ein týðandi óvissa, skulu vit í okkara grannskoðanarátekning vísa á upplýsingar um hesi viðurskifti í konsernroknskapinum og ársroknskapinum ella, um hesar upplýsingar ikki eru nøktandi, tillaga okkara niðurstøðu. Okkara niðurstøður byggja á tey grannskoðanarprógv, sum vit hava fingið fram til dagfestingina á okkara grannskoðanarátekning. Hendingar og viðurskifti í framtíðini kunnu tó føra við sær, at konsernin og felagið ikki longur megnar at halda fram við rakstrinum.

- Meta um ta samlaðu framløguna, bygnaðin og innihaldið í konsernroknskapinum og ársroknskapinum, herundir upplýsingarnar í notunum, umframt um konsernroknskapurin og ársroknskapurin vísa tey undirliggjandi handilsviðurskiftir og hendingar á ein slíkan hátt, at tað gevur eina rættvísandi mynd av hesum.

- Fáa hóskandi og egnaði grannskoðanarprógv fyri fíggjarligu upplysingunum um fyritøkurnar ella handilsvirksemið í konsernini, til tess at røkka eini niðurstøðu um konsernroknskapin. Vit hava ábyrgdina av at leiða, hava eftirlit við og at gera konserngrannskoðanina. Vit hava evstu ábyrgdina av grannskoðanarniðurstøðuni.

Vit samskifta við ovastu leiðsluna um millum annað vavið á ætlaðu grannskoðanini, og nær grannskoðað verður, og eisini um týðandi eygleiðingar, herundir um møguligar týðandi manglar í innanhýsis eftirlitinum, sum vit eyðmerkja undir grannskoðanini.

**Ummæli av leiðslufrágreiðingini**
Leiðslan hevur ábyrgdina av leiðslufrágreiðingini.

Okkara niðurstøða um konsernroknskapin og ársroknskapin fevnir ikki um leiðslufrágreiðingina, og vit geva onga niðurstøðu við vissu um leiðslufrágreiðingina.

Í sambandi við okkara grannskoðan av konsernroknskapinum og ársroknskapinum, er tað okkara ábyrgd at lesa leiðslufrágreiðingina, og í hesum sambandi at umhugsa um leiðslufrágreiðingin er í týðandi ósamsvari við konsernroknskapin og ársroknskapin ella ta vitan, ið vit hava fingið undir grannskoðanini, ella á annan hátt tykist at hava týðandi skeivleikar.

Okkara ábyrgd er eisini at umhugsa, um kravdu upplýsingarnar eftir ársroknskaparlógini eru umrøddar í leiðslufrágreiðingini.

Við støði í gjørda arbeiðinum er tað okkara fatan, at leiðslufrágreiðingin er í samsvari við konsernroknskapin og ársroknskapin, og at hon er gjørd í samsvari við ásetingarnar í ársroknskaparlógini. Vit eru ikki vorðin varug við týðandi skeivleikar í leiðslufrágreiðingini.

Tórshavn, hin 3. apríl 2024

P/F JANUAR
løggilt grannskoðanarvirki

Hans Laksá
Statsaut. revisor

# Høvuðs- og lyklatøl 2019-2023

| **Upphæddir í t. DKK** | **2023** | **2022** | **2021** | **2020** | **2019** |
|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstrarroknskapur** | | | | | |
| Nettosøla | 715.990 | 587.065 | 590.226 | 554.236 | 511.126 |
| Úrslit áðrenn av- og niðurskrivingar | 285.737 | 188.236 | 250.511 | 242.796 | 226.211 |
| Rakstrarúrslit | 113.719 | 17.518 | 88.503 | 101.379 | 112.612 |
| Fíggjarligir postar, netto | -48.954 | 2.553 | -34.225 | -40.167 | -37.040 |
| **Ársúrslit** | **53.139** | **16.667** | **44.231** | **49.809** | **62.379** |
| | | | | | |
| **Fíggjarstøða** | | | | | |
| Fíggjarstøðujavni | 3.514.611 | 3.634.698 | 3.230.068 | 3.207.960 | 2.918.099 |
| Tøkur peningur | 181.252 | 367.271 | 144.182 | 223.854 | 125.123 |
| Eginogn | 1.521.763 | 1.507.296 | 1.475.022 | 1.371.553 | 1.344.822 |
| **Langfreistað skuld** | **1.798.273** | **1.613.530** | **1.592.724** | **1.638.143** | **1.446.277** |
| | | | | | |
| Lyklatøl *) | | | | | |
| Renting av eginogn | 3,51% | 1,12% | 3,11% | 3,67% | 4,40% |
| Ognaravkast | 3,18% | 0,51% | 2,75% | 3,31% | 4,00% |
| Skuld netto/EBITDA | 5,8 | 8,6 | 5,9 | 6,2 | 6,1 |
| Ognarumferð | 0,20 | 0,16 | 0,18 | 0,17 | 0,17 |
| Eginognarpartur | 43,30% | 41,47% | 45,67% | 42,75% | 46,10% |

*) Lyklatølini eru útroknað í samsvari við Den Danske Finansanalytikerforenings „Anbefalinger & Nøgletal 2010".



# Leiðslufrágreiðing

# Leiðslufrágreiðing



**Endamálið hjá Sev**
Elfelagið Sev er eitt interkommunalt lutafelag, ið hevur til endamáls at fáa til vega elmegi og býta hana millum íbúgvarnar í limakommununum.

**Vinnuligar meginreglur**
Sambært elveitingarlógini § 3, stk. 1 stendur, at kommunur kunnu luttaka í elveitingarvirksemi sambært § 1, stk. 1 uttan mun til ásetingar í § 50, stk. 1 í kommunustýrislógini. Í sambandi við, at elveitingarøkið partvíst bleiv liberaliserað, fingu kommunurnar heimild til at reka elframleiðslu á vinnuligum grundarlagi.

Eftir viðtøkum elfelagsins skal endamálið fremjast sambært vinnuligum meginreglum á búskaparliga tryggum støði og við fyriliti at náttúru og umhvørvi. Eftir elveitingarlógini skal Sev (netvirksemið) fíggjarliga hvíla í sær sjálvum soleiðis, at inntøkurnar eru hóskandi til at gjalda rakstur og ætlaðar neyðugar íløgur. Í loyvunum hjá Sev fyri einstøku framleiðslueindirnar framgongur, at av roknskapinum skal framganga, hvørt framleiðslueindin hevur yvir- ella undirskot.

**Kommunurnar í Føroyum eiga Sev**
Allar kommunur í Føroyum eru limir í Sev. Limirnir heftu fram til árslok 2008 bæði fyri skuld felagsins og møguligum rakstrarhalli. Frá 1. januar 2009 hefta kommunurnar einans fyri felagsins skyldum mótvegis starvsfólkunum.

**Sjálvstøðug dótturfeløg**
Sev hevur við virknaði frá 1. januar 2016 stovnað sjálvstøðug dótturfeløg at umsita vindmyllulundirnar í ávikavist Neshaga, Porkeri og Húsahaga. Í móðurfelagsroknskapinum viðførir hetta, at keyp av vindorku fer at økjast, samstundis sum kostnaður av tilfari og lønum, avskrivingum og rentum fer at lækka. Úrslitið frá dótturfeløgum verður tikið inn í roknskapin gjøgnum úrslit av kapitalpørtum. Samlaða úrslitið í samtaksroknskapinum hjá Sev ávirkast ikki av hesum. Inniverandi frágreiðing fevnir um samlaða virksemið hjá felagnum í tíðarskeiðnum 1. januar – 31. desember 2023.

**Roknskaparliga gongdin í mun til fíggjarætlanina 2023**
Kríggið í Europa og langtíðarvirknaðurin av korona ávirkar framvegis fyritreytirnar hjá Sev at virka á tann hátt, at tilfars- og tænastuveitingar eru vornar dýrari eins og veitingartíðin er økt. Útlendsku prísirnir fyri el, gass og olju eru framvegis høgir. Hetta, samstundis sum virkisfýsni er stórt nógvastaðni, hevur viðført ein prísvøkstur kring um í heiminum, og fyri at mótvirka hesa "neiligu" gongd, hava tjóðbankarnir hækkað rentuna munandi seinastu tvey árini, men gongdin er nú at prísvøksturin er steðgaður, og at prísirnir eru á veg niður aftur. Hetta vil so viðføra, at tjóðbankarnir koma at seta rentuna niður aftur, og vil hetta eisini ávirka kostnaðin av at reka Sev rætta vegin.



## " Elframleiðslan úr grønum orkukeldum var hægri í 2023 enn nakrantíð áður, men tó lægri enn væntað"

Henda ávirkanin viðførdi høgan oljukostnað og hægri kostnað annars, so neyðugt var at hækka elprísin fyri 2023, og við hesum hækkaðu inntøkur felagsins. Umframt hesa hækking í elprísinum, hevur Sev selt meira streym enn ætlað.

**Úrslitið fyri 2023 gjørdist 53,1 mió. kr.**
Úrslitið áðrenn skatt gjørdist 64,8 mió. kr. móti ætlað 64,2 mió. kr., og úrslitið eftir skatt gjørdist 53,1 mió. kr. móti ætlað 52,6 mió. kr. Úrslitið er, sum nevnt omanfyri, ávirkað av støðuni í Europa og kring heimin annars, men úrslitið verður mett at vera nøktandi og sum ætlað.

**Sølan 25,4 mió. kr. hægri enn ætlað**
Fyri 2023 var ætlað við eini øking av kWt-søluni upp á 2,0%. Hetta var eisini galdandi innan vinnuliga partin fyri aling og framleiðslu av fiskavørum. Eisini var roknað við framgongd í elnýtsluni hjá vanligu privatu brúkarunum, men á einum lægri støði.

Streymsølan hevur sett met við 415,6 GWt og er hetta 20,0 GWt, ella 5,1% hægri enn ætlaðu 395,6 GWt. Framgongdin er serliga innan alikundar, almennu kundarnar og privatkundarnar.

Seinastu árini hevur stór framgongd verið í søluni til kundar innan alivinnuna, og henda framgongd heldur fram í ár, men ein afturgongd hevur verið innan framleiðslukundarnar. Harumframt er vøkstur innan kundabólkin fyri almennar tænastur og til privatkundar felagsins, íroknað sølu umvegis tann grøna málaran. Sølan til aðrar kundabólkar er á leið tann sama sum undanfarna ár og sum ætlað.

Av tí at sølan av kWt gjørdist hægri enn ætlað, eru inntøkur felagsins eisini hægri enn ætlað. Inntøkan frá íbindingargjøldum er eisini hægri enn ætlað, meðan inntøkan frá føstum gjøldum er eitt vet lægri enn ætlað. Inntøkan frá ómaksgjøldum og øðrum inntøkum er lægri enn ætlað.

Inntøkan frá søluni er 716,0 mió. kr. móti ætlað 690,6 mió. kr., ella 25,4 mió. kr. hægri, svarandi til 3,7%.

**Kostnaður til orkukeyp 10,2 mió. kr. lægri enn ætlað**
Vindmyllulundin hjá P/F Flatnahaga og tann hjá Sp/f Vindrøkt II hava framleitt inn á netið hjá Sev alt árið, og framleiðslan við vindi er økt munandi, tó at orkukeypið er lægri enn ætlað. At battarískipanin við synkronkompensatori á Sundi varð seinkað viðførdi, at minni vindur varð tikin inn á netið enn ætlað. Hetta skyldast eisini, at biogassverkið hevur framleitt minni enn væntað, og samanlagt gevur hetta eitt lægri orkukeyp enn ætlað, sí notu 2 í samtaksroknskapinum fyri sundurgreining av orkukeypinum frá øðrum framleiðarum.

**Oljuútreiðslur 36,6 mió. kr. hægri enn væntað**
Sev hevur brúkt 15.606 tons fleiri av tungolju enn væntað, og skyldast hetta, at ætlaða framleiðslan av elmegi við vindi er lægri enn ætlað, eins og Sev hevur selt fleiri kWt enn ætlað. Eisini hevur Sev nýtt 516 tons meira av gassolju enn væntað. Orsøkin er serliga fyri at kunna veita orku í sambandi við arbeiðið við tunlunum Norður um Fjall og stabilisering av netinum norðanfyri. Við hesum eru samlaðu oljuútreiðslurnar 36,6 mió. hægri enn væntað, sum talva 2 vísir.

Hægri kostnaðurin fyri olju í mun til fíggjarætlanina er sundurgreinaður í niðanfyri standandi talvu 2.

Elframleiðslan úr grønum orkukeldum var hægri í 2023 enn nakrantíð áður, men tó lægri enn væntað. Hetta er m.a. orsakað av, at vindmyllurnar hjá vindfelagnum í Neshaga hava verið raktar av feilum og tí ikki hava framleitt, eins og battarískipanin á Sundi ikki kom í rakstur fyrr enn í desember í ár. Hetta hevur havt við sær, at samlaða vindorkuframleiðslan er lægri enn hon kundi havt verið, og lægri enn væntað var.

Ætlað var við einari samlaðari elframleiðslu uppá 432,7 GWt, har grøna elframleiðslan var 293,3 GWt, svarandi til, at grøni framleiðsluparturin var 67,8%. Tá samanum




kom, var tann samlaða elframleiðslan í 2023 457,6 GWt, sum er 24,9 GWt meira enn ætlað, men har framleiðslan við grønari orku var 230,0 GWt. Sostatt var elframleiðslan við grønari orku 63,3 GWt lægri enn ætlað. Tey termisku verkini framleiddu 227,6 GWt móti ætlað 139,4 GWt, og hetta merkir sostatt, at elframleiðslan við grønari orku var 50,3%, og tann termiska orkan 49,7%.

**Tilfars- og tænastukostnaður er 13,8 mió. kr. hægri enn ætlað**

Kostnaðurin stavar frá bæði framleiðslu, net og fyrisiting. Framleiðsluverkini hava brúkt 8,0 mió. kr. meira enn ætlað, og netparturin 5,2 mió. kr. meira. Fyrisitingin hevur brúk 0,6 mió. kr. meira enn ætlað. Orsøkirnar eru hægri kostnaðir fyri viðlíkahald av motorum og vindmyllum, hækkandi prísir fyri tilfars- og tænastuveitingar, og høga aktivitetsstøðið hjá felagnum.

**Rakstrarførdar lønir 2,5 mió. kr. hægri enn ætlað**

Samlaður lønarkostnaður er 103,1 mió. kr., harav 95,3 mió. kr. eru rakstrarførdar, og 7,8 mió. kr. íløguførdar. Í fíggjarætlanini var ætlað við eini rakstrarføring uppá 92,8 mió. kr. soleiðis, at rakstrarført er 2,5 mió. kr. meira enn ætlað. Framleiðsluparturin hevur eina størri rakstrarførda nýtslu enn ætlað, og somuleiðis netparturin. Orsøkin er í høvuðsheitum økta kostnaðarstøðið og økta framleiðslan, og framleiðslan frá fleiri rakstrarstøðum, umframt at meira viðlíkahaldsarbeiði er gjørt á netinum í 2023.

**EBITDA 17,3 mió. kr. lægri enn ætlað**

Hægri inntøkur felagsins eru ikki nóg høgar at mótvirka serliga hægri oljukostnaði og tilfars- og tænastukostnaði.

Hetta hevur viðført, at EBITDA-talið ikki gjørdist eins høgt sum ætlað. Av tí at EBITDA ikki gjørdist sum ætlað, og felagið hinvegin ikki hevur framt allar ætlaðu íløgurnar, gjørdist nettoskuldin í mun til EBITDA 5,8 ferðir í mun til ætlað 6,0 ferðir. Sostatt er gongdin í lyklatalinum nøktandi og betur enn ætlað.

**Íløgurnar 135,0 mió. lægri og avskrivingarnar 6,4 mió. kr. lægri enn ætlað**
Ætlað varð við íløgum fyri 344,9 mió. kr., meðan hesar eru uppgjørdar til 209,9 mió. kr. ella 135,0 mió. kr. minni enn ætlað. Serliga eru tað ætlaðu íløgurnar í Elverkið í Botni, í Sundsverkið, í Pumpuskipanina og í Lonirnar á Landavegnum og virkisskráir, sum gjørdust lægri enn ætlað. Íløgurnar í framleiðsluna vórðu ætlaðar til 156,2 mió. kr., meðan tær gjørdust 62,6 mió. kr., ella 93,6 mió. kr. minni. Íløgurnar í netið vórðu ætlaðar til 155,9 mió. kr., meðan tær gjørdust 139,4 mió. kr., ella 16,5 mió. kr. minni. Íløgan hjá fyrisitingini bleiv ætlað til 32,9 mió. kr., har henda bleiv 7,9 mió. kr., ella 25,0 mió. kr. lægri.

At fleiri íløguarbeiði ikki komu eins langt og væntað í 2023 viðførir í høvuðsheitum, at avskrivingarnar eru lægri enn ætlað.

**Fíggjarkostnaðurin 11,4 mió. kr. lægri enn ætlað**
Fíggjarkostnaðurin er 49,0 mió. kr. og er tað lægri enn ætlað. Í kostnaðinum er innroknað virðisjavnan av fíggjarligum amboðum, sum í ár hava ávirkað raksturin, svarandi til eina inntøku uppá 11,3 mió. kr. Rentukostnaðurin og kostnaðurin til provisiónir gjørdist 60,3 mió. kr. móti ætlað 60,4 mió. kr., ein lægri kostnaður uppá 0,1 mió. kr.

Talva 1

### Rakstrarroknskapur og ætlan 2023 í mió. kr.

| | Roknskapur | Ætlan | Munur |
|---|---|---|---|
| Nettosøla | 716,0 | 690,6 | 25,4 |
| Orkukeyp | -41,1 | -51,3 | 10,2 |
| Oljuútreiðslur | -217,2 | -180,6 | -36,6 |
| Tilfar og tænastur | -76,7 | -62,9 | -13,8 |
| Lønir | -95,3 | -92,8 | -2,5 |
| Útreiðslur tilsamans | -430,3 | -387,6 | -42,7 |
| **Úrslit áðrenn avskrivingar og rentur** | **285,7** | **303,0** | **-17,3** |
| Avskrivingar | -172,0 | -178,4 | 6,4 |
| **Úrslit áðrenn fíggjarpostar** | **113,7** | **124,6** | **-10,9** |
| Rentuútreiðslur netto | -49,0 | -60,4 | 11,4 |
| **Úrslit áðrenn skatt** | **64,8** | **64,2** | **0,6** |
| Skattur | -11,6 | -11,6 | 0,0 |
| **Úrslit eftir skatt** | **53,1** | **52,6** | **0,5** |

## ROKNSKAPARLIGA GONGDIN Í MUN TIL FRAMSKRIVING 2023

**Kunning til eigarar**
Til eykaaðalfundin á heysti skal felagið mótvegis eigarunum, sambært viðtøkunum § 3, stk. 13b og § 4, stk. 12b, kunna um fíggjargongdina síðani ársaðalfundin, sum var 21. apríl 2023. Kunningin varð gjørd á eykaaðalfundinum 8. desember 2023, og víst verður til nærri kunning í frágreiðing til fundin, nevnd “Fíggjargongdin 2023” á heimasíðu felagsins www.sev.fo. Kunningin bygdi á staðfest tøl við endan av september umfram metingar og ætlanir fyri restina av árinum.

> “Samlaða sølan hækkaði 128,9 mió. kr., svarandi til eina hækking uppá 22,0%”

Talva 2

### Hægri oljukostnaður í mun til fíggjarætlan, mió. kr.

| | |
|---|---|
| Ómaksgjald til oljuveitarar | 0,3 |
| Virðisjavnan av oljugoymslu sambært roknskaparreglum | -2,1 |
| Lægri kostnaður av tungoljunýtslu | -28,0 |
| Kostnaður fyri meirnýtslu av tungolju | 62,8 |
| Gassolja | 6,0 |
| Smyrjiolja og Urea | -2,3 |
| **Íalt** | **36,6** |

## ROKNSKAPARLIGA GONGDIN Í 2023

**Úrslitið fyri 2023 fyri skatt gjørdist 64,8 mió. kr.**
Felagið hækkaði elprísin fyri kundar felagsins í 2023 við millum 0,18 kr. til 0,28 kr. pr. kWt. Harumframt vóru hækkingar og lækkingar gjørdar í fasta gjaldinum. Hesar broytingar í inntøkugrundarlagnum vórðu gjørdar grundaðar á hækkandi kostnaðarstøði, serliga á kostnaðinum fyri olju og tilfars- og tænastuveitingar, umframt møguleikan at fremja neyðugar ætlaðar íløgur.

Rakstrarúrslitið fyri skatt fyri árið gjørdist 64,8 mió. kr., sum er hægri enn undanfarna ár. At úrslitið gjørdist hægri enn undanfarna ár skyldast eina hægri sølu av el og meirinntøkuni av príshækkanini. Oljukostnaðurin og kostnaðurin til tilfars- og tænastuveitingar er framvegis á einum høgum støði. Rakstrarførdu lønirnar eru hægri enn undanfarna ár, tí ein javning av tænastumanna eftirlønum ávirkaði rakstrarførdu lønirnar jaliga vegin undanfarna ár. Harumframt vóru avskrivingarnar eisini hægri enn seinasta ár.

Rentukostnaður og javning av fíggjarligum amboðum vóru serligir undanfarna ár, har felagið inntøkuførdi stóra javning av teimum fíggjarligu amboðunum grundað á uppgangandi rentustøði, gjaldoyrakursum og oljuprísi. Hetta ávirkaði fíggjarkostnaðin og javning av fíggjarligum amboðum jaliga vegin undanfarna ár so mikið, at talan var um eina inntøku. Í ár er hinvegin talan um ein kostnað av hesum, tó at ein ávís inntøkuføring hevur verið av javning av teimum fíggjarligu amboðunum. Undir notu 7 sæst ein sundurgreining av hesum.

**Inntøkurnar 128,9 mió. kr. hægri**
Samlaða sølan hækkaði 128,9 mió. kr., svarandi til eina hækking uppá 22,0%. Inntøkan frá streymsøluni øktist við 126,4 mió. kr., meðan inntøkan frá íbindingargjøldum lækkaði við 0,5 mió. kr. í mun til undanfarna ár. Inntøkurnar frá fasta gjaldinum eru 21,7 mió. kr., ein øking uppá 3,5 mió. kr.

Økingin í inntøkuni frá streymsøluni skyldast prís-hækkanini fyri 2023 og fram, og hægri elsølu upp á 20 GWt, har framgongdin í søluni til serliga alivinnuna og privatkundarnar er stór. Nærri sundurgreining av søluni er í notu 1 í samtaksroknskapinum. Harumframt verður víst til leiðslufrágreiðingina í netroknskapinum, har sølan av kWt til teir einstøku kundabólkarnar er sundurgreinað.

**Kostnaðurin til olju 7,3 mió. kr. lægri**
Felagið brúkti 2.889 tons meira av tungolju í framleiðsluni enn undanfarna ár. Eisini brúkti felagið 720 tons meira av gassolju. Hinvegin var kostnaðurin av tungoljuni og gassoljuni, sum felagið brúkti, lægri enn undanfarna ár og við hesum fellur samlaði kostnaðurin, sjálvt um nýtslan er størri. Víst verður til leiðslufrágreiðingina í framleiðsluroknskapinum fyri fleiri sundurgreiningar og umrøðu.

**Tilfars- og tænastukostnaður øktur við 2,7 mió. kr.**
Samlaði kostnaðurin er øktur við 2,7 mió. kr. í mun til undanfarna ár. Framleiðslan hevur ein øktan kostnað uppá 0,3 mió. kr. og netparturin hevur økt sín kostnað við 2,4 mió. kr. Kostnaðarstøðið fyri netpartin hevur verið lágt seinastu árini og ikki er tað óvæntað, at tað er hækkandi. Fyrisitingin hevur lækkað sín kostnað við 0,6 mió. kr.

Serliga kostnaðurin fyri maskinur er øktur við 3,7 mió. kr., og stavar hesin økti kostnaðurin frá øktum viðlíkahalds-arbeiði á motorar og vindmyllur felagsins.

Ótryggu tíðirnar hava viðført eina munandi uppstígan á KT- og trygdarøkinum, tí at elfelagið varðar av týðandi



Talva 3

## Rakstrarroknskapur í mió. kr.

| | 2023 | 2022 | Broyting mió. kr. |
|---|---|---|---|
| Nettosøla | 716,0 | 587,1 | 128,9 |
| Orkukeyp | 41,1 | 17,3 | 23,8 |
| Oljuútreiðslur | 217,2 | 224,5 | -7,3 |
| Tilfar og tænastur | 76,7 | 74,0 | 2,7 |
| Lønir | 95,3 | 83,1 | 12,2 |
| Útreiðslur tilsamans | 430,3 | 398,8 | 31,4 |
| **Úrslit áðrenn avskrivingar og rentur** | **285,7** | **188,2** | **97,5** |
| Avskrivingar | 172,0 | 170,7 | 1,3 |
| **Úrslit áðrenn fíggjarpostar** | **113,7** | **17,5** | **96,2** |
| Rentuútreiðslur netto | 49,0 | -2,6 | 51,5 |
| **Úrslit áðrenn skatt** | **64,8** | **20,1** | **44,7** |
| Skattur | 11,6 | 3,4 | 8,2 |
| **Úrslit eftir skatt** | **53,1** | **16,7** | **36,5** |

Talva 4

## Úrslit fyri seldan kWt í krónum

| | 2023 | 2022 | Broyting | Broyting % |
|---|---|---|---|---|
| Miðalinntøka seldan kWt | 1,72 | 1,49 | 0,24 | 16,0 |
| Miðalkostnaður seldan kWt | 1,59 | 1,44 | 0,15 | 10,5 |
| **Úrslit seldan kWt** | **0,13** | **0,04** | **0,09** | **203,2** |

kritiskum undirstøðukervi í samfelagnum. Hetta spælir eisini ein leiklut í høga kostnaðinum av KT-økinum, og hesin kostnaður væntast at vaksa komandi árini.

Víst verður til nærri sundurgreiningar av kostnaðinum í notu 4 í samtaksroknskapinum.

**Rakstrarførdur lønarkostnaður hækkaður við 12,2 mió. kr.**
Útreiðsluførdi lønarkostnaðurin er hækkaður við 12,2 mió. kr. í rakstrinum, soleiðis at rakstrarførdar eru 95,3 mió. kr. í 2023 í móti 83,1 mió. kr. í 2022. Samlaðu lønirnar eru 103,1 mió. kr., harav 7,8 mió. kr. eru íløguførdar. Í 2022 var lønarkostnaðurin 99,2 mió. kr., harav 8,5 mió. kr. vóru íløguførdar. Í 2022 er javning av tænastamannaeftir-lønum inntøkuførd við 7,6 mió. kr. meðan ein útreiðslu-føring uppá 0,1 mió. kr. er gjørd fyri 2023. Um tað verður sæð burtur frá javningini av tænastumannaeftirlønunum, eru samlaðu lønarútreiðslurnar í 2023 103,1 mió. kr. og 99,2 mió. kr. í 2022, sum er ein øking upp á 3,9 mió. kr. Javningin av lønarútreiðslunum fyri tænastumanna-eftirlønirnar ávirkar soleiðis rakstrarførda lønarkostnaðin og samanberingina av lønarkostnaðinum millum árini.

Lønarkostnaðurin til framleiðsluverkini er hækkaður við 4,0 mió. kr. grundað á meira virksemi. Kostnaðurin til netpartin er vaksin við 2,7 mió. kr., her er eisini talan um meira virksemi kring alt landið. Lønarkostnaðurin til fyrisitingina er hækkaður við 5,5 mió. kr. Orsøkin er javningin av tænastumannaeftirlønunum. At lønar-kostnaðurin er hækkaður, skyldast at fleiri starvsfólk eru sett í starv, sáttmálajavning av lønum og eisini er yvirtíð rindað starvsfólkum.

Talva 5

## Nettosøla, mió. kr

| | 2023 | 2022 | Broyting | Broyting % |
|---|---|---|---|---|
| kWt-gjald | 679,8 | 553,4 | 126,4 | 22,8 |
| Fast gjald | 21,7 | 18,2 | 3,5 | 19,3 |
| Íbinding | 15,6 | 16,0 | -0,5 | -2,9 |
| Ómaksgjald v.m. | -1,1 | -0,6 | -0,6 | 105,7 |
| **Nettosøla** | **716,0** | **587,1** | **128,9** | **22,0** |
| Keyp av vind- og biogassorku | -41,1 | -17,3 | -23,8 | 137,7 |
| **Nettosøla** | **674,9** | **569,8** | **105,1** | **18,5** |

Talva 6

## Tilfars- og tænastuveitingar, mió. kr.

| | 2023 | 2022 | Broyting | Broyting % |
|---|---|---|---|---|
| Framleiðsla | 36,8 | 36,5 | 0,3 | 0,8 |
| **Net** | **18,1** | **15,6** | **2,4** | **15,6** |
| Fyrisiting | 21,8 | 21,9 | -0,1 | -0,3 |
| **Tilsamans** | **76,7** | **74,0** | **2,7** | **3,6** |

Talva 7

## Lønarútreiðslur, mió. kr.

| | 2023 | 2022 | Broyting | Broyting % |
|---|---|---|---|---|
| Framleiðsla | 42,6 | 38,6 | 4,0 | 10,4 |
| Net | 35,0 | 32,3 | 2,7 | 8,4 |
| **Fyrisiting** | **17,7** | **12,2** | **5,5** | **45,6** |
| Javning tænastumannaeftirlønir | 0,1 | -7,6 | 7,7 | |
| **Tilsamans** | **95,3** | **83,1** | **12,2** | **14,7** |

## " Úrslitið áðrenn avskrivingar, rentur og skatt er 95,7 mió. kr. hægri enn undanfarna ár"

Lønarkostnaðurin fylgir teimum sáttmálunum, sum er galdandi á teimum ymisku økjunum. Víst verður til nærri sundurgreiningar av kostnaðinum í notu 5 í samtaks-roknskapinum.

**EBITDA 95,7 mió. kr. hægri**
Úrslitið áðrenn avskrivingar, rentur og skatt er 95,7 mió. kr. hægri enn undanfarna ár. Orsøkin er, sum nevnt omanfyri, fyrst og fremst hægri elprísir og hægri kWt-søla mótvegis høgum oljukostnaði og hægri tilfars- og tænastukostnað, eins og hægri rakstrarførdan lønarkostnað.

Nettoskuldin sama tíðarskeið er hækkað við 55,8 mió. kr. til 1.664 mió. kr. soleiðis, at nettoskuldin í mun til EBITDA er 5,8 ferðir í mun til 8,6 ferðir undanfarna ár. Innanhýsis markið er ásett til 6,0 ferðir, meðan lánveitarar loyva felagnum, at nettoskuldin í mun til EBITDA kann verða upp til 9,0 ferðir. Sostatt er felagið innanfyri ásettu

Talva 8

### Íløgur, mió. kr.

| | 2023 | 2022 |
|---|---|---|
| Framleiðsla | 62,6 | 69,2 |
| Net | 139,4 | 160,6 |
| Fyrisiting | 7,9 | 11,2 |
| **Tilsaman** | **209,9** | **241,0** |

Talva 9

### Íløgur, mió. kr.

| | 2023 | 2022 |
|---|---|---|
| Íløgur bókaðar til arbeiði í gerð | 213,7 | 219,2 |
| Beinleiðis bókaðar íløgur sum tilgongd | -3,7 | 21,8 |
| **Íløgur við ársenda** | **209,9** | **241,0** |

Talva 10

### Arbeiði í gerð, mió. kr.

| | 2023 | 2022 |
|---|---|---|
| Salda við ársbyrjan | 296,7 | 210,0 |
| Íløgur bókaðar til arbeiði í gerð | 213,7 | 219,2 |
| **Arbeiðir førd til avskrivingar sum tilgongd** | **-249,0** | **-132,5** |
| Salda við ársenda | 261,4 | 296,7 |
| **Broyting í arbeiði í gerð** | **-35,3** | **86,7** |

krøvini frá lánveitarunun og innanhýsis markið hjá felagnum.

**Av- og niðurskrivingarnar 1,3 mió. kr. hægri**
Av- og niðurskrivingarnar eru, eftir oljukostnaðin, næststørsti útreiðslupostur í roknskapinum. At hesin kostnaður er øktur seinastu árini kemur av teimum íløgum, sum felagið hevur gjørt seinastu árini. Avskrivingargrundarlagið er millum annað serliga økt við nýggju støð 3 á Sundsverkinum og teimum nógvu íløgunum, ið felagið ger á netsíðuni. Víst verður til nærri sundurgreiningar av kostnaðinum í notu 9 í samtaksroknskapinum.

**Fíggjarkostnaður hækkaður við 51,5 mió. kr.**
Samlaða bruttoskuldin hevur eina fasta rentu stavandi frá lánsbrøvum við fastari rentu, eins og ein partur av bankaskuldini er avdekkaður við rentutryggingaravtalum fyri rentuna. Í fíggjarkostnaðinum er rentukostnaður, órealiseraður kostnaður og kurstap og kursvinningur av fremmandum gjaldoyra innroknaður. Hesin kostnaður er tengdur at rentutryggingaravtalunum og gjaldoyraamboðunum, sum felagið nýtir fyri at avdekka váðan innan økið.

Orsøkin til, at kostnaðurin er so sveiggjandi hesi bæði árini, er gongdin á altjóða fíggjarmarknaðinum, og í hesum sambandi verða fíggjarligu amboðini at javna samsvarandi gongdini.

Víst verður til nærri sundurgreiningar av kostnaðinum í notu 7.

Talva 11

### Tilgongd til støðisogn, mió. kr.

| | 2023 | 2022 |
|---|---|---|
| Arbeiði førd til avskrivingar sum tilgongd | 249,0 | 132,5 |
| Beinleiðis bókaðar íløgur sum tilgongd á støðisogn | -3,7 | 21,8 |
| **Tilgongd við ársenda** | **245,3** | **154,3** |



## " Elsølan økist væntandi í 2024 við 4,5%, og harvið eisini framleiðslan"

**Íløgurnar gjørdust 209,9 mió. kr.**
Aftur í ár hevur felagið gjørt stórar íløgur í bæði net og framleiðslu umframt fyrisiting fyri 209,9 mió. kr. Undanfarna ár vóru íløgurnar eisini stórar við 241,0 mió. kr.

Íløgurnar sundurgreinast í framleiðslu, net og fyrisiting, sum talva 8 vísir.

Talvurnar 9-11 vísa gongdina í íløgum, arbeiði í gerð og tilgongd til støðisogn.
Víst verður eisini til net- og framleiðsluroknskapirnar fyri sundurgreining av íløgunum í 2023.

Íløgurnar í verkætlanina fyri pumpuskipanina í Vestmanna í 2023 eru nýttar uppá myndugleikaviðgerð og projektering. Sev væntar at formligar avgerðir um loyvir v.m. frá myndugleikum fyriliggja í 2024, og at Sev hevur móttikið tilboð frá arbeiðstakarum uppá verkætlanina. Við hesum fæst at vita endaliga kostnaðin av hesi verkætlan, fyri at kunna taka endaliga støðu í málinum. Fyri nærri umrøðu av málinum verður víst til frágreiðingina frá nevndini í samband við ársfrágreiðingina, og sum er at finna á www.sev.fo.

Umframt framdu íløgurnar hevur Sev hækkað partapeningin í P/F Vindfelagnum í Neshaga og Porkeri við 3 mió. kr. til kurs 600, svarandi til eina samlaða kapitalhækking uppá 18 mió. kr. Hækkingin av eginpeninginum er í sambandi við verkætlanina fyri uppsetan av 7 vindmyllum í Porkerishaganum. Áður hevur verkætlanin verið fíggjað umvegis millumrokning við Sev, men henda er nú fíggjað við einum langfreistaðum láni og eginpeningi. Kapitalhækkanin og langfreistaða lánið framgongur av móðurfelagsroknskapinum, men ikki samtaksroknskapinum.

**Gjaldførið er gott**
Við tað, at Sev hevur góða sjálvfígging frá rakstri felagsins, og at Sev í 2022 endurfíggjaði skuld og trekningsrættir og fekk til vega nýggja fígging, er gjaldføri gott.

Sev endurfíggjaði 1.305 mió. kr. í lántøku og trekningsrættum til íløgur og gjaldføri. Harafturat var fingið til vega fígging uppá 900 mió. kr. til íløgur umvegis trekningsrættir og lán. Íalt er talan um 2.205 mió. kr. í endurfígging og nýggjari fígging.

Av teimum 2.205 mió. kr. eru 1.105 mió. kr. fingnar til vega á US Private Placement marknaðinum, og av teimum 1.105 mió. kr. kom seinasti parturin 205 mió. kr. til høldar í desember 2023.

Av teimum 2.205 mió. kr. eru 1.100 mió. kr. fingnar til vega sum bankafígging. 850 mió. kr. eru fingnar til vega frá Betri Banka, BankNordik, LÍV og Skandinaviska Enskilda Banken (SEB) sum trekningsrættir, og 250 mió. kr. frá Nordisk Investment Bank (NIB) sum lán.

Gjaldførisbroyting felagsins frá rakstrinum var 158,7 mió. kr. móti 135,7 mió. kr. í 2022. Sostatt var sjálvfíggingin til íløgur positiv.

Tøkur peningur felagsins við ársenda er 181,3 mió. kr. móti 367,3 mió. kr. undanfarna ár. Harumframt koma óbrúktir trekningsrættir og kassakredittir í peningastovnum upp á tilsamans 850 mió. kr. at nýta til íløgur og gjaldføri. Sostatt er tøki peningurin, kredittir og óbrúktir trekningsrættir 1.030,9 mió. kr. móti 1.217,3 mió. kr. undanfarna ár.

Hartil skal leggjast tøk fígging frá NIB uppá 250 mió. kr. at nýta til verkætlanina fyri Pumpuskipan í Vestmanna. Neyðugt er at hava eitt trygt gjaldføri til dagliga raksturin av felagnum, eins og tað verður mett skilagott at hava eitt munagott gjaldføri við atliti at ótryggleikum á fíggjarmarknaðunum.

**Útlit fyri rakstrarárið 2024**
Felagið hevur hækkað elprísin til kundar sínar fyri 2024 og fram. Hetta er ein avleiðing av, at Føroya Landsstýri hevur hækkað umhvørvisgjaldið á tungolju í 2024 og fram.




Felagið væntar eitt avlop av rakstrinum í 2024 upp á 37,7 mió. kr. áðrenn skatt. Eftir skatt verður úrslitið væntandi 30,9 mió. kr.

Elsølan økist væntandi í 2024 við 4,5%, og harvið eisini framleiðslan. Umsetningurin væntast at verða 763,4 mió. kr.

Oljukostnaðurin er framhaldandi á einum høgum støði við 218,6 mió. kr., sum er eitt vet hægri enn kostnaðurin í 2023. Føroya Landsstýri hevur hækkað umhvørvisgjaldið uppá tungoljuna, sum Sev brúkar í elframleiðsluni, galdandi frá 2024 og fram. Hetta viðførir ein hækkandi oljukostnað fyri Sev og hetta ávirkaði á tann hátt, at elprísurin fyri 2024 hækkaði. Tá er umhvørvisgjaldið á tungoljuna innroknað við 32 mió. kr. Av tí at virðisjavnan av oljugoymsluni ávirkar NIBD til EBITDA vísitalið í ov stóran mun, er avgjørt at seta av 12 mió. kr. fyri virðisjavning av oljukostnaðinum í fíggjarætlanini fyri at taka hædd fyri hesum.

Kostnaðurin til tilfars- og tænastuveitingar er ætlaður til 68,8 mió. kr., sum er lægri enn kostnaðurin í 2023. Kostnaðurin til lønir er hækkaður við tað, at fleiri fólk eru sett í starv í 2023, eins og hesin hækkar við vanligum lønarhækkingum, einstøkum umflokkingum, og at nøkur fólk afturat væntandi verða sett í starv grundað á økt virksemi. Ætlandi gerst rakstrarførdi kostnaðurin til lønir 97,3 mió. kr., sum er hægri enn kostnaðurin í 2023. Avskrivingarnar eru ætlaðar til 223,0 mió. kr. móti 172,0 mió. kr. í 2023. Orsøkin til hækkandi avskrivingarkostnaðin eru íløgurnar, ið felagið ger. Harumframt er roknað við einari niðurskriving upp á vindmyllurnar í Neshaga við 13 mió. kr.

Nettorentukostnaðurin er ætlaður til 65,4 mió. kr., sum er hægri enn kostnaðurin fyri 2023. Avsett er ikki fyri virðisjavning uppá fíggjarligu amboðini.

Ætlandi verða íløgur fyri 538,8 mió. kr. gjørdar, eins og roknað verður við øktari netto lántøku uppá 250 mió. kr. at nýta til íløgur í 2024. Hvørt lántøkan økist, veldst um hvørt ella nær stóru ætlaðu verkætlanirnar verða framdar.

Væntandi verður langfreistaða skuldin 2.096 mió. kr. við árslok 2024. Nettoskuldin verður 1.930,2 mió. kr.

Roknað verður við 165,3 mió. kr. í tøkum peningi við árslok 2024, umframt atgongd til trekningsrættir uppá 850 mió. kr. hjá fíggjarveitarum, ella íalt 1.015,3 mió. kr. Harvið hevur felagið eitt gott gjaldføri og er ført fyri at røkja allar sínar skyldur.

Nettoskuldin (NIBD) í mun til inntøkur felagsins frá rakstrinum (EBITDA) við ársenda verður ætlandi 5,9 ferðir og eginpeningurin í mun til samlaðu ognirnar verður væntandi 41,1%.

Nærri lýsing av, hvat Sev ger hesum viðvíkjandi, sæst í Rakstrar-, fíggjar- og íløguætlan felagsins 2024 á www.sev.fo.

**Hendingar eftir roknskaparlok**
Frá degnum fyri fíggjarstøðuni til í dag er einki hent, sum ávirkar metingina av ársfrásøgnini.



# Árið 2023
# í stuttum

# Árið 2023 í stuttum

### Úrslit eftir skatt
**53,1** MIÓ
**Millíónir krónur**
Úrslitið er nøktandi.
Ætlað var við 53 mió. kr.

### Íløgur
**210** MIÓ
**Millíónir krónur**
Flestar íløgurnar í
árinum í netvirksemi

### Tøkt gjaldføri
**1,03** MIA
**Milliardir krónur**
Sev endurfíggjaði skuld á sumri 2022, og
fekk til vega nýggja fígging til komandi
íløgur

### Vøkstur søla
**22** %
**Prosent**

### Eginognarpartur
**43,3** %
**Prosent**

### Vøkstur GWt-søla
**5,1** %
**Prosent**

### Nettoskuld og EBITDA
**5,8**
**(Lutfall)**
Lutfallið millum nettoskuldina
og EBITDA

### Grøn orka
**50,3** %
**Prosent**
Talið er nakað lægri
enn undanfarna ár

# Árið 2023 í stuttum



Januar

## Minesto og Sev leingja samstarvsavtaluna um sjóvarfalsorku í Føroyum

Fyrst í 2023 endurnýggjaðu og víðkaðu Sev og Minesto samstarvsavtaluna. Avtalan tilskilar ábyrgdarbýtið viðvíkjandi arbeiðnum við sjóvarfalsorku í Vestmannasundi og Hestfirði.

Avtalan varð víðkað til eisini at fevna um samstarv um menning og fyrireiking av einum øki í Hestfirði til sjóvarfalsorku og umfatar somuleiðis víðkað virksemið í Vestmanna. Harumframt verður arbeitt við at seta upp eina íløgueind at umsita verkætlanarstuðul, keypsavtalu, møguliga almenna fígging (t.d. frá Horizon hjá ES) og aðrar ognir.

Minesto hevur nýliga fullfíggjað Dragon 4 økið við einum sjókaðali afturat og eltøkniliga infrakervinum annars. Installatión á landi til 1,2 MW drekan Dragon 12 verður avgreitt samstundis.

Samstarvið er grundað á gjøgnumskygni av dátum millum Minesto og Sev í mun til verandi verkætlanir eins væl og upplýsingum um og lýsingum av verandi og ætlaðum staðsetingum fyri felags verkætlanir.

Stjóri í Sev, Hákun Djurhuus, sigur soleiðis um samstarvið: “Minesto hevur víst eitt sterkt tilknýti til verkætlanina í Føroyum, og tøknin er í støðugari menning. Vit síggja fram til, at fleiri drekar verða settir út, og til at økið í Hestfirði verður kannað nærri”, sigur Hákun Djurhuus, stjóri í Sev.




Mars

### Earth Hour - elnýtslan minkaði 3 MW og var 84% burðardygg

Í Føroyum varð aftur í 2023 skipað fyri tiltøkum kring landið í sambandi við Earth Hour. Lagt verður upp til, at fólk sløkkja ljós, sjónvarp, teldur osfr. og heldur geva náttúruni og hvør øðrum gætur. Eisini fyritøkur og kommunur eru við, og eitt nú verða gøtuljósini í flestu kommunum sløkt.

Fyri at kunna meta um undirtøkuna fyri hesum átaki, fylgja vit á Sev við, um og hvussu elnýtslan minkar hesa løtuna. Í 2023 minkaði elnýtslan í samfelagnum hendan tíman við 3 MW, sum er eitt sindur meira enn árið fyri. Elframleiðslan í meginøkinum tíma jarðarinnar kom niður á góð 45 MW, meðan í Suðuroy fall elnýtslan lutfalsliga meira enn í meginøkinum, t.e. úr góðum 4 MW niður í 3,5 MW, og elframleiðslan í Suðuroy var 100% grøn tíma jarðarinnar.



Mars

### Væleydnaður 60+ dagur hjá Sev

Í mars bjóðaði Sev aftur verandi og fyrrverandi starvsfólkum hjá Sev yvir seksti og makum teirra til 60+ dag við spennandi tiltøkum og framløgum. Í ár vóru á leið 50 luttakarar við, og skráin fevndi um hóskandi mát av álvara og gaman. Bergtóra Høgnadóttir, HR-leiðari á Sev, setti dagin við at greiða frá um mentala partinum av fyrireikingini til sokallaða arbeiðsfría lívið. Harumframt greiddi lækni frá heilsuligum viðurskiftum, ein persónligur venjari gav góð ráð um kropsliga venjing, og umboð fyri pensjónsfelag hevði framløgu um pensjón. Harafturat sang Stanley Samuelsen nøkur vøkur løg ímillum framløgurnar.

Luttakararnir lótu væl at tiltakinum og eitt starvsfólk, ið var við fyri fyrstu ferð, segði soleiðis um dagin: “Ein fantastiskur dagur. Skráin var so væl samansett og so væl doserað, at áðrenn eg visti av, vóru vit liðug. Framløgurnar vóru allar sera áhugaverdar og viðkomandi og høvdu júst rætta longd. Deiligt og rørandi at uppliva Stanley Samuelsen mitt á degnum, og stuttligt at arbeiða við persónsmenskunum. Alt í alt ein sera góður og væl fyriskipaður dagur.”



Apríl

### Oljukostnaðurin tyngdi roknskapin hjá Sev

Á aðalfundi í apríl varð lagt fram, at yvirskotið hjá Sev eftir skatt fyri árið 2022 var 16,7 milliónir krónur. Hetta var minni enn ætlað, og varð ikki mett at vera nøktandi. Størsta orsøkin til lægra yvirskotið var økti oljukostnaðurin, ið tyngdi roknskapin hjá Sev fyri 2022. Tó kundi oljukostnaðurin verið hægri, um Sev ikki hevði prístryggjað síni oljuinnkeyp.

Úrslitið av høga útreiðslustøðinum varð greitt í heyst, og tá var avgjørt at hækka elprísin frá 1. januar 2023.




Mai

### Væl eydnað altjóða ráðstevna um elskipanir

Sev var vertur fyri altjóða ráðstevnuni '7th Annual Hybrid Power Systems Workshop' um smáar elskipanir í samstarvi við týsku fyritøkuna Energynautics.

Á leið 100 útlendskir granskarar, veitarar og starvsfólk í elgeiranum, umboðandi fleiri enn 20 lond, vóru á ráðstevnuni, sum Ingilín D. Strøm, landsstýriskvinna í umhvørvismálum setti.

Fleiri áhugaverdar framløgur vóru hildnar á ráðstevnuni. Av føroysku framløguhaldarunum kunnu nevnast Helma Maria Tróndheim fyri Sev, Kári Mortensen fyri Umhvørvisstovuna og Tórstein Balle, Ph.D.- lesandi á Setrinum.

Luttakararnir vóru víða um í Føroyum við einum útferðardegi í Vestmanna og einum í Suðuroy. Á útferðini í Vestmanna greiddu umboð fyri Minesto frá royndarverkætlanini við sjóvarfalsorku í Vestmannasundi, og í Suðuroy vitjaðu luttakararnir millum annað øll orkuverkini hjá Sev. Tey vóru bergtikin av battarískipanini, ið kann javna og partvís goyma vindorku, og sum hevði veitt suðringum 100% burðardygga elorku síðstu 10 dagarnar undan vitjanini.



Tað var ein serlig løta fyri Robin Strunk, Lucas Reus og Marco Alferink, tá teir sum tað allarfysta á túrinum í Suðuroy vitjaðu vindmyllulundina í Porkerishaganum. Allir skriva teir hvør í sínum lag um elskipanina í Suðuroy, men hetta var fyrsta ferðin, at teir vóru 'on site'.

Mai

### Suðuroyggin sum serligt granskingarøki

Elskipanin í Suðuroy er serlig við synkronkompensatori og battarískipan, sum hevur eins stóran mátt og vindmyllulundin sjálv. Hetta hevur vakt áhuga uttanlands, og fleiri granskingarverkætlanir um hesa elskipan eru í umbúna.

Við á útferðini til Suðuroyar, sum varð fyriskipað í sambandi við altjóða ráðstevnuna um smáar elskipanir, vóru tríggir týskir Ph.D.-lesandi, ávikavist knýttir at lærda háskúlanum í Bremen og Hannover, sum skriva hvør sína uppgávu um elskipanina í Suðuroy. Hetta var fyrsta ferðin, at teir høvdu møguleika at vitja á staðnum.




Juli

## Dagførdur samskiftisleistur

Fyrsta tekin um tað hóvliga samleikaskiftið, sum Sev hevur framt, var ólavsøkulýsingin. Nýggi samleikin byggir á litirnar, sum listamaðurin Jack Kampmann mælti Sev til at brúka á sinni, tá Fossáverkið einaferð skuldi málast. Hann mælti til at brúka jarðlitirnar grønt, reytt og gult við íblástri frá okkara ríku náttúru. Síðani hava hesir litir eyðkent bygningar hjá Sev.

Um túsundáraskiftið fekk Sev búmerki við ljósabláari hvirlu, sum hevur verið brúkt síðani, men við hesum skifti verður nú róð aftur á gamlar gøtur. Myrkagrøna litin kenna vit aftur, meðan appilsinguli liturin er ein samanrenning millum reyða og gula litin frá bygningunum.




September

## Fólkatingið á ferð í Húsahaga

Sev fær javnan vitjan av útlendingum, sum hava áhuga fyri grønu kósini. Í september vitjaðu umboð fyri danska fólkatingið í Húsahaga. Tey fingu frágreiðing um grønu kósina, og um møguleikar og avbjóðingar fyri eina 100% avbyrgda elskipan tá orkukeldurnar eru 100% burðardyggar og óstøðugar.

Fólkatingsumboðini vístu stóran áhuga fyri leiðini hjá Føroyum móti eini meira burðardyggari framtíð.



Frá vinstru Hákun Djurhuus, stjóri, saman við Bjørg á Rógvi, borgarstjóra, og Jón Kragesteen, formanni í FNU.

September

## Opið hús í Vestmanna

Á vestmannadøgunum var opið hús hjá Sev. Dagurin byrjaði við, at Bjørg á Rógvi, borgarstjóri, Jón Kragesteen, formaður í Føroya Náttúru- og umhvørvis-felagi og Hákun Djurhuus, stjóri í Sev saman plantaðu eitt træ uttan fyri Fossáverkið. Træið er ein alpuroyn, sum Sev hevur fingið í 75 ára føðingardagsgávu frá FNU. Træið er ímynd av samstarvi og felags ynskinum um eina burðardygga framtíð.

Á takinum á koplingsstøðini lat upp søgulig myndaframsýning, og øll vóru vælkomin at vitja Fossáverkið, koplingsstøðina og goymsluna.



Hákun Djurhuus, stjóri, festi heiðursmerkið á bringuna á Poul og takkaði honum fyri ídni í 40 ár.

Oktober

## Heiðursmerki fyri tænastu í 40 ár

2. oktober fekk Poul Bech handað heiðursmerkið 'Dronningens fortjenstmedalje i sølv' fyri trúgva tænastu í fýrati ár.

Poul Bech, leiðandi montørur, hevur øll árini starvast á rakstrardeildini hjá Sev í Suðuroy, og har hevur hann verið við til at røkja og menna elnetið í Suðuroy í øllum veðri til allar tíðir og harumframt ígjøgnum allar tær stóru broytingarnar, sum eru farnar fram á økinum.

"Fólk trívast væl og leingi hjá Sev, og tað er sanniliga at gleðast um", sigur Bergtóra Høgnadóttir, HR-leiðari hjá Sev. Miðalstarvsaldurin er 13 ár, og í 2023 høvdu 41 av starvsfólkunum starvast hjá Sev í 20 ár ella meira.



November

## Linjuarbeiði á Kunoyarnesi

Í stilla og kalda veðrinum í november bleiv upprudding eftir linjuarbeiði á Kunoyarnesi gjørt. Økið er ikki serliga høgligt at koma til, og tí var neyðugt at fáa tyrluna hjá Atlantic Airways at hjálpa. Arbeiðið gekk skjótt og væl, ikki minst óføru montørum hjá Sev at takka.

Um arbeiði sigur Jón Nielsen, deildarstjóri fyri netið hjá Sev: "Vit ganga høgt uppí at rudda upp eftir okkum og at lata økið aftur í so góðum standi sum gjørligt".

Við nýggju kaðallinjunum er ikki longur tørvur á loft-linjuni, ið hevur veitt streym til Kunoyarnes og nærum alt alibrúkið hjá Bakkafrost útfyri Kunoyarnes.




Desember

## Burðardygga framleiðslan setti met í 2023

Nýggi vindmátturin og skipanirnar við stabiliserandi tøkni gera sítt til, at elframleiðslan úr varandi orku ongantíð hevur verið størri.

Tilsamans 230 GWt av ávikavist vatni, vindi, sól, biogass og sjóvarfalsorku komu inn á elnetið í 2023.

Økti eftirspurningurin eftir elorku hevði tó við sær, at lutfallið í prosentum røkk góð 50%, tó at samlaða nøgdin av burðardyggari orku var hægri enn nakrantíð. Tað er serliga vindorkuframleiðslan, sum er økt í mun til undan-farin ár, og kemst hetta partvís av, at meira vindorka er sett upp og partvís av, at battarískipanir ávikavist í Suðuroy og í meginøkinum tryggja, at vindurin kemur til høldar.

Battaríski panin í meginøkinum varð tó ikki verksett fyrrenn í desember, so ágóðin av henni verður væntandi størri komandi árini.

Elframleiðslan í Suðuroy var 100% burðardygg í tilsamans 128 samdøgur og yvir 80% burðardygg í 156 samdøgur. Í meginøkinum var elframleiðslan yvir 80% burðardygg í 58 samdøgur og yvir 95% burðardygg í góð 4 samdøgur.



Desember

### Battarístøð á Sundi verksett

Í desember var hátíðarhald á Sundi tá 12 MW stóra battarískipanin og synkron-kompensatorin vóru verksett.

Aksel V. Johannesen, løgmaður, fekk heiðurin av at tendra skipanina.

Vindorka er óstøðug orka, og tí er avmarkað hvussu nógv vindorka kann latast inn á netið, um ikki tað skal hava neiliga ávirkan á netið. Tvær stórar vindmyllulundir eru settar upp í meginøkinum, ávikavist á Gellingarkletti og í Flatnahaga, afturat vindmyllulundini í Húsahaga. Tí er neyðugt við stabiliserandi tøkni, t.e. battarískipan og synkronkompensatori fyri at tryggja, at sum mest av vindorkuni í meginøkinum kann fáast til høldar.

Uppsetingin er lík tí, sum Sev hevur royndarkoyrt í Suðuroy við góðum úrsliti. Tó er skipanin í meginøkinum 10 ferðir størri enn tann í Suðuroy.



Desember

### Fossáverkið í Vestmanna virkið í 70 ár

Í desembur vóru 70 ár liðin síðan ljós kom yvir landið. Í 1953 varð vatnorkuverkið Fossáverkið í Vestmanna sett í royndarrakstur og Sev veitti streym til bygdir í Streymoynni, Eysturoynni og yvir um Vestmannasund til Vágar.

# Framleiðsla í 2023

Sev hevur orkuverk kring alt landið. Hesi eru vatnorkuverk, oljurikin verk, tríggjar vindmyllulundir, ein sólorkulund umframt smáverk á útoyggjunum.

Í einum oyggjasamfelagi sum Føroyum - við 18 oyggjum - har bert ein er óbygd, hevur Sev sum elveitari nógv elverk og fleiri eykaelverk til at taka fyri at tryggja støðuga elveiting.

Sev keypir eisini orku frá øðrum veitarum, t.e. vindorku, biogass og sólorku.




## Býtið í % 2023





# Grøn fígging

# Grøn fígging

### Frágreiðing um lutfall av varandi orkuframleiðslu 2023

Sev endurfíggjaði sína langfreistaðu skuld á sumri í 2022, og fekk samstundis til vega nýggja fígging, sum í høvuðsheitum skal nýtast til at fíggja íløgur í varandi orkukeldur.

Sev hevur yvirfyri sínum lánveitarum bundið seg til at røkka nøkur minstamát fyri varandi orkuframleiðslu árini 2022 - 2030. Um lutfallið av varandi orkuframleiðslu ikki røkkur málinum í einum einstøkum árið, skal Sev rinda eykarentu í tíðarskeiðinum, sum lutfallið er lægri enn ásett í lániavtalunum.

Lutfallið av varandi orkuframleiðslu í einum fíggjarárið merkir lutfallið av varandi orkuframleiðslu í mun til samlaðu orkuframleiðsluna í fíggjaraárinum, víst í prosentum.

Myndin vísir tey mál fyri lutfall av varandi orkuframleiðslu, sum Sev hevur sett sær fyri at røkka árini 2022 - 2030. Málið fyri lutfallið av varandi orkuframleiðslu økist frá 44% til 73% í tíðarskeiðinum frá 2022 til 2030.

**Sum myndin vísir, var málið fyri varandi orkuframleiðslu 54% fyri 2023. Hetta mál er ikki rokkið við einum staðfestum lutfallið upp á 50% varandi orkuframleiðsla í 2023. Sev hevur rindað lánveitarunum 0,7 mió. kr. í eykarentu í mars 2024.**

### Lániavtalurnar hjá Sev áseta fylgjandi lutfall av varandi orkuframleiðslu fyri árini 2022 - 2030




### Útrokning av lutfallinum av varandi orku

Lutfallið av varandi orkuframleiðslu í einum fíggjarárið merkir lutfallið av varandi orkuframleiðslu í mun til samlaðu orkuframleiðsluna í fíggjarárinum víst í prosentum (útroknað við fylgjandi frymli):

$$\text{Lutfall av varandi orkuframleiðslu (í \%)} = \left( \frac{\text{F vindorka + F vatnorka + F sjóvarfals-, sól-, pumpuorka}}{\text{F tilsaman}} \right) \text{x100}$$

har
"F vindorka" merkir framleiðsla í GWt í fíggjarárinum við vindorku;
"F vatnorka" merkir framleiðsla í GWt í fíggjarárinum við vatnorku;
"F sjóvarfals-, sól, pumpuorka" merkir framleiðsla í GWt í fíggjarárinum við sjóvarfalsorku, sólorku og pumpuorku; og
"F tilsaman" merkir samlaða framleiðslan í GWt í fíggjarárinum, íroknað framleiðsla við termiskari orku.



# Starvsfólka-hópurin 2023

# Starvsfólka-hópurin 2023

Starvsfólkahópurin hjá Sev var í 2023 183 í føstum starvi. 142 menn og 41 kvinnur. Starvsfólkahópurin er øktur úr 174 til 183 farna ár. Lærlingar eru settir, og eisini at neyðugt hevur verið við uppnormeringum og nýggjum førleikum í fyritøkuni, til tess at røkka málinum um at gerast 100% grøn á landi í 2030. Miðalstarvsaldurin hjá starvsfólkunum er 13 ár. Leiðararnir vóru 25 í tali og av teimum vóru 6 kvinnur í 2023.





Sev raðfestir áhaldandi, at starvsfólk okkara støðast og mennast í fyritøkuni. Hetta verður gjørt á fleiri  hættir. Nú arbeiðsloysið í Føroyum er metlágt, kýta arbeiðsgevarar seg bæði fyri at fáa skikkaðar umsøkjarar og fyri at varðveita dugnaliga starvsfólkahópin.

Stavsfólkahópurin hjá Sev er broyttur seinastu árini. Fleiri eru farin úr starvi vegna aldur, pensjónsaldurin hjá Sev er 70 ár. Onnur hava sagt seg úr starvi og eru farin í onnur størv. Eisini eru fleiri starvsfólk farin í annað starv í Sev.

Fleiri umsøkjarar til størv hjá Sev, virðismeta at  fyritøkan hevur so fjølbroyttar og breiðar arbeiðsuppgávur, at til ber at flyta seg internt á arbeiðsplássinum. Sostatt er ikki óvanligt, at starvsfólk okkara hava arbeitt hjá Sev í fleiri ár, kanska áratíggju, men at tey hava havt sera ymiskar arbeiðsuppgávur.

Vert er eisini at nevna, at Sev er eitt alment arbeiðspláss, har størv skulu lýsast leys.

### Fólk flutt starv innanhýsis í Sev

Í 2023 fluttu 4 starvsfólk hjá Sev úr einari deild til aðra – annaðhvørt permanent ella eitt tíðarbil. Tað kann vera ein stórur fyrimunur bæði fyri Sev og fyri einkulta starvsfólki, at fólk stundum kunnu flyta seg og royna nýggjar uppgávur í fyritøkuni. Hetta hava vit javnan sæð dømir um. Fyri Sev er tað ein fyrimunur at varðveita góð, dugnalig og vitug starvsfólk, sum kenna arbeiðsplássið, virðini, uppgávur, mentan og samstundis at tey kunnu mennast og flytast, bókstaviliga í fyritøkuni, tá tørvur er á tí og sjálvandi, tá tey sjálvi ynskja og eru fús til tess.

| Ársverk | Aldurspenni | Miðalaldur |
|---|---|---|
| 185 | 18-73 | 48,5 |
| Tillagað størv | Starvsvenjing | Lærlingar |
| 5 | 6 | 3 |

Hetta er uttan iva ein orsøk til at starvsaldurin hjá Sev er rættiliga høgur, samanborið við aðrar fyritøkur.

### Sjúkufrávera

Sjúkradagarnir hjá starvsfólkum á Sev vóru í 2023 11,0 dagar í miðal. Ætlanin er, at starvsfólk framyvir verða boðin til umsorgnarsamrøðu, tá tey antin hava verið sjúk í meir enn tvær vikur ella hava verið sjúk meir enn 3 ferð í einum ári.

### Starvsfólk í tillagaðum starvi

Sjálvsagt skal starvsfólkahópurin hjá Sev endurspegla samfelagið, hetta merkir eisini at fólk, sum hava varandi skerdan arbeiðsførleika, teljast millum starvsfólkini hjá Sev. Hetta er galdandi innan øll øki hjá Sev – net, framleiðslu og fyrisitingarpartin. Fimm fólk vóru í tillagaðum starvi hjá Sev í 2023.

### Lærlingar hjá Sev

Í 2023 vóru 3 lærlingar hjá Sev, ið heldur seg hava eina samfelagsliga ábyrgd, at føroyingar hava útbúgvingarmøguleikar í Føroyum. Hagtøl vísa, at nógvir ungir føroyingar fara av landinum í lestrarørindum. Ein sannroynd er eisini, at jú longri tíðarbil fólk eru av landi skotin, jú minni eru sannlíkindini fyri, at tey koma heimaftur.

Sev tekur lærlingar inn, fyrst og fremst tí vit halda, at hjá Sev eru vit før fyri at geva fólkum eina góða útbúgving, læru og førleikar. Eisini er sannføringin, at tað ríkar fyritøkuna og dynamikkin í fyritøkuni, at bæði yngri og tilkomin fólk starvast hjá Sev. Sum kunnugt er starvs-

## Býti av starvsfólkum

Myndin vísir, hvussu tey 183 starvsfólkini í føstum starvi við árslok 2023 eru býtt út á eindirnar.




## Starvsfólk í føstum starvi

Stabbamyndin vísir starvsfólk í føstum starvi við ársenda 2012 - 2023.



fólkaaldurin 48,5 ár. At seta lærlingar er eisini við til at lækka miðalaldurin í starvsfólkahópinum hjá Sev.

Nevnast kann eisini, at vit halda okkum hava eina skyldu at hava bæði praktikantar, maskinmeistara-aspirantar og lærlingar, við tað at vit jú eru eitt av teimum størstu arbeiðsplássunum í Føroyum, sum eru avtakarar innan hetta økið.

### Javnstøða hjá Sev

Rúm er avgjørt fyri ábótum innan javnstøðuøkið. Nevnd og leiðsla eru burturav menn. Av teimum 25 leiðarunum eru 6 kvinnur.

Ynskið er, at kvinnur í nógv størri mun eru sjónligar í hagtølunum hjá Sev, men greitt er, at flest menn eru útbúnir innan teknisku økini, hetta kann hava ávirkan. Sjálvandi eigur tað at vera soleiðis at føroyingar – kvinnur og menn – uppliva, at tey kunnu spegla sær og hava fyrimyndir av báðum kynum - í øllum liðum hjá Sev.

Vit hava havt hepna hond, tá vit hava sett lærlingar, við tað at vit hava og hava havt kvinnur í læru bæði sum maskinsmiðir, elektrikarar og innan skrivstovu.

## Aldur

Miðalaldurin í starvsfólkahópinum er lækkaður við 1,5 ári til 48,5 ár í mun til 2022, tá hann var 50 ár. Við árslok 2023 vóru 52 starvsfólk 60 ár og eldri.




## Starvsaldur

Miðalstarvsaldurin er 13 ár. Í 2023 høvdu 41 av starvsfólkunum starvast hjá Sev í 20 ár ella meira.



# ESG-lyklatøl
# 2023

## Starvsfólk

| Lyklatøl | Eind | 2023 | 2022 |
|---|---|---|---|
| Arbeiðsstyrki | Fulla tíð % | 183 | 174 |
| Starvsfólkaskifti | % | 7 | 5 |
| Sjúkrafrávera | Dagar/starvsfólk | 11 | 11 |
| Lønarmunur millum kyn | Ferðir | 1,2 | 1,2 |
| Lønarmunur millum stjóra og starvsfólk | Ferðir | 2,0 | 2,0 |

### Kynsbýti
Menn / Kvinnur




### Kynsbýti á leiðarastigi
Menn / Kvinnur




## Umhvørvið

| Lyklatøl | Eind | 100 í 2030 | 2023 | 2022 |
|---|---|---|---|---|
| $CO_2$e, vav 1 | Tons | 0 | 151.928 | 139.762 |
| Varandi framleiðsla | % | 100 | 50 | 52 |

### $CO_2$e, vav 1
Tons




### Varandi framleiðsla
%





# Heilsa, trygd og umhvørvi

# Heilsa, trygd og umhvørvi

Sev orðaði hin 17. desember 2008 Heilsu-, Trygdar- og Umhvørvispolitikk (HTU), ið er alment tøkur á heimasíðuni hjá Sev.



## TRYGD

Sev er eitt framkomið virki, sum raðfestir trygd og arbeiðsumhvørvi frammarlaga til gagns fyri okkum øll. Á mynd 1 sæst trygdarskipanin hjá Sev.

### Trygdarnevnd

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Trygdarumboð **Rógvi Rasmussen** | Trygdarumboð **Robert Joensen** | Arbeiðsleiðari **Otto West** | Arbeiðsleiðari **Jørgin Mørkøre** | HTU-leiðari **Annika F. Berg** | Stjóri **Hákun Djurhuus** | Deildarstjóri, net, rakstrarleiðari **Jón Nielsen** | Deildarstjóri, framleiðsla **Heri Mortensen** | Deildarstjóri, fyrisiting **Bogi Bendtsen** |

### Trygdarbólkar

| BÝTISVIRKIR SUÐURØKIÐ | BÝTISVIRKIR MEGINØKIÐ | HØVUÐS-KONTROLRÚM | SUNDSVERKIÐ | VERKINI Í SUÐUROY | GRØNU ORKUVERKINI | INNLEGGING | FYRISITING | VERKFRØÐI | ELTØKNI |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Arbeiðsleiðari **Edvard Jacobsen** | Arbeiðsleiðari **Jógvan Kristoffersen** | Arbeiðsleiðari **Eyðbjørn F. Petersen** | Arbeiðsleiðari **Jørgin Mørkøre** | Arbeiðsleiðari **Jóanes Norðberg** | Arbeiðsleiðari Sæmund **Tausen** | Arbeiðsleiðari **Eyðun Djurholm** | Arbeiðsleiðari **Bogi Bendtsen** | Arbeiðsleiðari **Høgni Hansen** | Arbeiðsleiðari **Eyðun Jensen** |
| Trygdarumboð **Kjartan Bech** | Trygdarumboð **Robert Joensen** | Trygdarumboð **Robert Sørensen** | Trygdarumboð **Uni Mortensen** | Trygdarumboð **Hilmar Bech** | Trygdarumboð **Rógvi Rasmussen** | Trygdarumboð **Anna Vang** | Trygdarumboð **Pauli Djurholm** | Trygdarumboð **Eirikur Norðberg** | Trygdarumboð **Gunnhildur Øster Bech** |
| Býtisvirkir | | | Framleiðsla | | | | | | |

**Mynd 1.** Trygdarskipanin hjá Sev.

## Persónskaðar

Hóast Sev arbeiðir skipað við trygdini, og visjónin er, at eingir skaðar henda, slepst ikki heilt undan skaðum. Á mynd 2 sæst tal av persónskaðum, sum hava havt við sær óarbeiðsføri í ein ella fleiri dagar umframt skaðadagin. Í 2023 er ein persónskaði fráboðaðir Arbeiðseftirlitinum.




**Mynd 2.** Tal av persónskaðum, ið hava haft við sær óarbeiðsføri í ein ella fleiri dagar umframt skaðadagin, og sum eru fráboðaðir Arbeiðseftirlitinum.

## Umhvørvið

Á mynd 3 sæst ein mynd av høvuðsárinunum, virksemið hjá Sev hevur á umhvørvið í sambandi við elframleiðslu. Høgruegin á myndini sæst, hvørji evni verða nýtt í framleiðsluni. Ovast og niðast á myndini sæst, hvørji evni ávikavist verða útleidd til luft og sjógv í framleiðsluni. Á vinstru síðu sæst, hvørji evni fáast burtur úr framleiðsluni – til dømis kann nevnast el og fjarhiti.

Tann vanliga elframleiðslan fer fram á 13 verkum, sum framleiða eftir tørvi. Av hesum 13 verkunum eru trý stór oljurikin verk – Strond, Sund og Vágsverkið. Sev hevur seks vatnorkuverk – Strond, Eiðisverkið, Fossáverkið, Mýruverkið, Heygaverkið og verkið í Botni. Harumframt fimm smáverk, sum elveita Fugloy, Mykines, Koltur, Skúvoy og Stóru Dímun.

Sev hevur harafturat fimm vindmyllur í Neshaga í Eysturoynni, 13 vindmyllur í Húsahaga omanfyri Tórshavn og 7 í Heimara parti í Porkeri.

**Umhvørvisgóðkenningar**

Fyritøkur, virkir ella útbúnaðir, ið eru at finna í fylgiskjalinum til Løgtingslóg um umhvørvisvernd, skulu hava eina umhvørvisgóðkenning. Tey virkir ella útbúnaðir, talan er um hjá elfelagnum Sev, eru Sundsverkið og Vágsverkið, hjá P/F Vindfelagnum í Neshaga, eru vindmyllurnar í Neshaga og Porkeri, og hjá P/F Vindfelagnum í Húsahaga, eru vindmyllurnar í Húsahaga.

| Galdandi umhvørvisgóðkenningar | Sett í gildi |
|---|---|
| Umhvørvisgóðkenning av elverkinum á Sund | 28.03.18 |
| Umhvørvisgóðkenning av vindmyllum í Neshaganum | 13.01.12 |
| Umhvørvisgóðkenning av elverkinum í Vági | 18.11.15 |
| Umhvørvisgóðkenning av vindmyllum í Húsahaga | 16.01.13 |
| Umhvørvisgóðkenning av vindmyllunum í Porkeri | 05.05.20 |




**Mynd 3:** Yvirlit yvir tey høvuðsárin, virksemið hjá Sev hevur á umhvørvið.

## Útlát til luftina

Eitt tað største árinið á umhvørvið er brenningin av fossilum brennievnum. Størsti parturin av $CO_2$-útlátinum frá virkseminum hjá Sev stavar frá oljunýtsluni til framleiðslu. Mynd 4 vísir, hvussu stórt útlátið av $CO_2$ var í 2023 í sambandi við framleiðslu av el. Her sæst, at tað specifikka $CO_2$ útlátið á útoyggjum er munandi hægri enn tað fyri meginøkið, Suðuroy og alt landið. Orsøkin til hetta er, at bert fossilt brennievni verður nýtt í framleiðsluni á útoyggjum, meðan stórur partur av elframleiðsluni á meginøkinum og í Suðuroy starvar frá grønum orkukeldum.




**Mynd 4:** Víst verður, hvussu stórt útlátið av $CO_2$ hevur verið í samband við framleiðslu av el í 2023 uppgivið í g/kWt.

**Mynd 5:** Víst verður býti í % millum termiska og grøna orku tað er frá vindi, vatni, sól, biogass og sjóarfall. Eisini sæst elframleiðslan frá 2008 til 2023 uppgivið í MWh.

Yvirskipaða málið hjá Sev er at gerast 100% grøn í 2030. Á næstu mynd sæst, hvussu býtið er millum grønu og termisku framleiðsluna hjá Sev, eisini sæst hvussu elframleiðslan økist frá 2008 til 2023. Síggjast kann, at framleiðslan úr grønaru orku var 50% í 2023. Eisini sæst, hvussu nóg orka stavar frá sól, biogassi og sjóarfall.

Seinastu árini hevur Sev keypt fleiri elbilar, hetta millum annað fyri at minka um útlátið av $CO_2$.

## Býtið í % 2023




## Býti í % millum termiska (olja) og grøna (vatn, vind, sól og biogass) orku frá 2008 til 2023



## Burturkast

Gjøgnum virksemið hjá Sev verður nógv burturkast framleitt. Ein stórur partur av tí framleidda burturkastinum verður brent og endurnýtt, og eisini verður burturkast sent til serviðgerð, hetta er tað sum kallast serligt dálkandi burturkast – eitt nú kemikaliirestir.

Í sambandi við grevstur verður nógv mold, grót o.a. latið til tyrvingarplássini. Vanliga verður tað, sum verður tyrvt, roknað sum serliga tyngjandi fyri umhvørvi, men tá ið hetta í flestu førum er ódálkað mold og grót, sum verður endurnýtt, eru hesi tøl ikki tikin við í yvirlitinum. Ein onnur orsøk er, at tað er torført at fáa savnað øll hesi tøl, tí at tey í fleiri førðum eru tengd at ymiskum verkætlanum, har onnur gera hetta arbeiði fyri okkum.




**Mynd 6:** Yvirlit yvir burturkast fyri 2020 til 2023.

Á mynd 7 sæst yvirlit yvir burturkast til endurnýtslu frá 2020 til 2023. Størsti parturin av burturkastinum til endurnýtslu er spillolja, sum verður latin IRF. Eisini eru káplar ein stórur partur.

Myndin vísir, at fleiri káplar eru latnir til endurnýtslu í 2023 samanborið við árið frammanundan. Hetta kemst av, at nógv arbeiði verður gjørt at taka linjur niður og leggja kaðalar í lendið. Nógvir kaðalar eru eisini frá nýbygging av t.d. koplingsstøðum.




**Mynd 7:** Yvirlit yvir burturkast til endurnýtslu frá 2020 til 2023.

# Váðaviðurskifti

# Váðaviðurskifti

Váðar hjá felagnum kunnu sundurgreinast í ymiskar bólkar.

## MARKNAÐARVÁÐAR

Sev hevur seinastu árini gjørt stórar íløgur í framleiðslueindir og net, og Sev skal framhaldandi gera stórar íløgur eitt nú í pumpugoymsluskipan í Vestmanna. Grundað á allar íløgurnar sum Sev hevur gjørt, og er í ferð við at gera, kann sigast, at Sev í ein ávísan mun eisini er eitt verkætlanarfelag, har tað er neyðugt at hugsa langskygt og leggja fíggjarætlanir, sum samsvara hesum. Hetta viðførir, at tað er umráðandi at kenna týdningarmiklu kostnaðirnar, eitt nú oljukostnaðin, gjaldoyrakostnaðir og rentukostnaðir.

Møguleikin hjá Sev at heinta øktan kostnað inn í gjøgnum elprísin ella onnur gjøld, partvíst ella heilt, er avmarkaður, og møguleikin at hava undirskot ella ikki nøktandi úrslit av rakstrinum, letur seg bara gera í eitt ávíst tíðarskeið. Prísstøðið er í síðsta enda eitt mál fyri eigararnar hjá Sev og harvið politiskt tengt við góðkenning frá Elveitingareftirlitinum, meðan fígging av øktum kostnaði umvegis gjaldføri frá fígging letur seg bara gera í eitt styttri tíðarskeið og avmarkar møguleikarnar fyri ætlaðum íløgum, tá ið fíggjarliga orkan fer til at fíggja øktan kostnað.

Í sambandi við lántøku hyggja fíggjarstovnar eftir roknskaparligu lyklatølunum fyri týdningarmiklastu økini, og kravið til hesi lyklatøl er eitt nú støðufesti. Fyri at fáa kappingarføra fígging til vega er neyðugt at møta ella lúka krøvunum frá fíggjarveitarum um at avdekka týdningarmiklastu váðarnar mótvegis vaksandi kostnaði. Sev er ein áhugaverdur kundi at veita fígging til, og kann sambært ráðgevum tess skrásetast sum ein “investment grade” kundi. Hetta gevur møguleika fyri einari góðari fígging upp á fleiri mátar. Skal Sev framhaldandi fáa góða fígging til vega, er neyðugt at halda hetta “ratingstøði”. Tá er neyðugt at hava ein støðugan rakstur við einum nøktandi avkasti, sum ger, at roknskaparligu lyklatølini vera á hædd við lyklatølini hjá feløgunum, sum Sev kappast við um fíggingingar.

Sev hevur saman við SEB (Skandinaviska Enskilda Banken), sum er ráðgevari hjá Sev innan fíggjarøkið og váðaøkið (prístryggingarøkið), arbeitt við eini ætlan at avdekka váðan í sambandi við olju- og gjaldoyrakeyp eins og rentu. Í hesum sambandi hevur felagið gjørt eina “prístryggingarstrategi” (hedgingstrategi) fyri olju, gjaldoyra og rentu. Prístryggingarstrategiin er eisini partur av lánsavtalunum, sum felagið fekk til vega í desember 2016 og í juni 2022.

**Rentuváði**

Sev hevur sum strategi at tryggja upp til 100% av skuldini við eini gildistíð longri enn 12 mánaðir til eina fasta rentu. Somuleiðis skal miðalgildistíðin av fastløstu rentuni vera millum 5 og 10 ár. Hetta verður gjørt á tann hátt, at Sev kann arbeiða við avdekkningum av rentuváðanum innanfyri eitt spenn millum 80 og 100% av skuldini til eina og hvørja tíð. Skuldin kann hava eina avtalaða fasta rentu ella eina broytiliga rentu, sum verður avdekkað við eini avtalu um umbýting av broytiligari rentu til fasta rentu (rentuumbýtingaravtalu/rentuswap).

Hesin háttur krevur, at fastrentuskuldin skal viðlíkahaldast soleiðis at skilja, at tá ið fastrentuparturin antin fellur undir 80% ella økist til yvir 100%, skulu tillagingar gerast í rentu-umbýtingaravtalunum (rentuswapsavtalunum). Hetta viðførir, at ávísar rentuumbýtingaravtalur skulu lokast fyri til dømis at umganga, at ein størri partur enn 100% er rentutryggjaður. Hetta viðførir aftur, at

virðið av rentuumbýtingaravtaluni skal gerast upp. Eitt jaligt virði lækkar fíggjartørvin hjá Sev, meðan eitt neiligt virði økir fíggjartørvin. Javningin av rentutryggingar-avtalunum skal í høvuðsheitum bókast yvir eginogn felagsins. Sev fer at stremba eftir, at hava eina javna samanseting av rentutryggingaravtalum yvir tíð, har málið er at hava eina miðal fasta rentu millum 5 til 10 ár.

Sev hevur í sambandi við lántøkuna tryggjað sær eina fasta rentu upp á alla sína bruttoskuld við árslok 2023 frá lánsbrævafíggingini. Harumframt hevur felagið gjørt rentuumbýtingaravtalu fyri skuldina, sum ætlandi íkemur, tá felagið ger brúk av láninum frá NIB, so hvørt íløgur verða framdar. Hetta er samsvarandi strategi fyri trygging av rentuváða. Sostatt fer ein øking í rentustøðinum generelt ikki at ávirka lántøkuna frá lánsbrævafíggingini og láninum frá NIB. Rentu-umbýtingaravtalur skulu gerast fyri lántøkur frá trekningsrættunum, tá felagið ger brúk av teimum.

| Marknaðarváði | Kreditt- og mótpartsváði | Rakstrarligir váðar | Strategiskir og aðrir váðar |
|---|---|---|---|
| Rentuváði | Áogn hjá kundum | Veitingartrygd | Teir strategisku váðarnir eru meira yvirskipa tengdir at, hvussu felagið skipar sítt virksemi, politisk viðurskifti, umdømi o.s.fr. |
| Oljuprísváði | Innistandandi hjá bankum | Kunningartøkni (KT) | Nýggj tøkni (disruption) |
| Gjaldoyraváði | Lánsbrøv | Feilir í innanhýsis mannagongdum | Verkætlanir |
| Gjaldførisváði | Tryggingar | Feilir av mannaávum | Vitanarstøði og menning |
| | | Heilsa, trygd og umhvørvi | |

| | Ár 1 | Ár 2 | Ár 3 | Ár 4 | Ár 5 |
|---|---|---|---|---|---|
| Oljuprístrygging | 80% | 60% | 40% | 20% | 20% |

**Oljuprísváði og gjaldoyrisváði**
Ein avleiðing av íløguætlanini komandi árini er, at prístryggingar-strategiin fyri olju og gjaldoyra er víðkað til at fevna um 4 ár aftrat inniverandi ári. Hetta er sama tíðarskeið, tá ið lántøkan hjá felagnum væntast at hækka við umleið 600 mió. kr. til umleið 1.600 mió. kr.

Sev hevur avdekkað oljuprísváðan eftir niðanfyri standandi leisti.

Hetta viðførir, at tryggingardekkningurin verður stovnaður ár eitt fyri einstøku rakstrarárini. Í ár tvey verður hesin tryggingardekkningur so øktur fyri aftur at endurgeva ein avdekkning upp á 5 ár. Hesin leistur tryggjar eina stigvísa stovnan av tryggingini á einum støði, sum endurgevur eina miðal prísgongd av teimum ymisku árunum. Sev hevur avdekkað váðan við eini fastprístrygging.

Samstundis sum tryggingardekkningurin fyri prísin upp á oljuna er gjørdur, eru teir dollarar, sum skulu nýtast til oljukeypið eisini keyptir upp á termin, fyri harvið at avdekka gjaldoyrisváðan í dollarum.

Við einum hækkandi oljuprísi og hækkandi dollarkursi fer ein slík avdekkan av oljuprísváðanum og gjaldoyra-váðanum at hava eina tálmandi ávirkan á kostnaðin, og rakstrarúrslitið gerst meiri støðugt. Hinvegin ávirkast oljukostnaðurin av virðisjavnin av oljugoymsluni við mánaðarlok, samsvarandi roknskaparreglunum.

**Gjaldførisváði**
Sev hevur sum mannagongd, at áðrenn farið verður í gongd við einstakar verkætlanir, skal fígging til hesar fyriliggja, innan byrjað verður. Við hesum er fígging altíð tøk til verkætlanirnar.

Harumframt skal felagið altíð í minsta lagi hava umleið 100 mió. kr. innistandandi í peningastovnum at taka til, um tað gerst neyðugt. Í sambandi við rakstur er felagið við hesum 100 mió. kr. ført fyri at svara hvørjum sítt teir næstu umleið 3-6 mánaðirnar, uttan at felagið hevur nakrar inntøkur. Harumframt er ynskiligt, at hava atgongd til kassakredittir, sum stuðla undir gjaldførinum um neyðugt. Í løtuni hevur felagið ein rakstrarkreditt til vanligt gjaldføri upp á 200 mió. kr.

## KREDITT- OG MÓTPARTSVÁÐAR

**Áogn hjá kundum**
Felagið ansar støðugt eftir skuldarbindingini hjá kundum mótvegis felagnum. Felagið hevur eina fasta mannagongd fyri, hvussu fylgt verður upp á útistandandi hjá kundum felagsins. Verður ikki rindað til tíðina, fær kundin sendandi áminningar, og hevur kundin ikki rindað innan ávísa tíð, eftir at triðja áminningin er send kundanum, verður elveitingin til kundan slitin. Henda mannagongd avmarkar váðan mótvegis kundum felagsins, tó at felagið kann hava avmarkaðan váða av einstøkum størri kundum.

**Innistandandi hjá peningastovnum**
Ansað verður støðugt eftir at býta innistandandi hjá felagnum millum fleiri peningarstovnar, sum hava ávísa búskarparliga styrkju, fyri harvið at avmarka váðan.

**Lánsbrøv**
Sum ein møguleika til innistandandi hjá peningastovnum kann felagið keypa donsk stats- ella realkredittlánsbrøv. Fyri at avmarka kursváðan í hesum sambandi verður dentur lagdur á lánsbrøv við stuttari lánitíð.

**Tryggingar**
Sev hevur saman við ráðgevara tess innan tryggingar arbeitt við avdekkan av tryggingarváðum soleiðis, at miðað verður eftir, at eingin einstakur skaði og samanlegging av skaðum ikki skal ávirka rakstrarúrslitið hjá Sev við meiri enn 10 mió. kr.

## RAKSTRARLIGIR VÁÐAR

Ásannast má, at tað ikki heilt slepst undan rakstrarligum váðum, men hesir váðar kunnu avmarkast til eitt nærri ásett støði, sum kann góðtakast við átøkum, mannagongdum og eftirlitum, sum nevnd og leiðsla seta út í kortið.

**Veitingartrygd**
Endamálið við elveitingarlógini er millum annað at tryggja, at elveitingin í Føroyum verður løgd til rættis við fyriliti at veitingartrygd, samfelagsbúskapi og umhvørvi. Orkugoymslur felagsins verða støðugt eftirmettar, og felagið økir um oljugoymslurnar fyri at hava nøktandi orku í eitt longri tíðarskeið, um neyðugt. Harafturat verður fyrilit tikið fyri vatnorkugoymslum felagsins á sumri, fyri at tryggja, at felagið hevur neyðugan tiltøkumátt. Prísurin fyri elmegina skal ikki verða hægri enn neyðugt við fyriliti fyri veitingartrygd, elgóðsku, umhvørvi og øðrum tænastum/skyldum, sum Sev hevur mótvegis kundunum. Sev skal altíð hava ein tryggan og effektivan rakstur, sum røkkur ásettum málum fyri veitingartrygd. Felagið arbeiðir framhaldandi við at varðveita veitingartrygdina og góðskuna av elmegini.

Veitingartrygdin tilsigur, at neyðugt er at taka atlit at illveðri og øðrum óvæntaðum hendingum. Her hevur Sev seinastu mongu árini arbeitt við at kaðalleggja linjur soleiðis, at vandin fyri neiligari ávirkan á hesum økinum er minkaður.

**KT og innanhýsis mannagongdir**
Váðalækkandi virksemi kann verða KT-trygdarpolitikkur og leiðreglur o.a. innan KT. Politikkir fyri mannagongdir, eftirlit og funktiónsskilnað. Eisini er framhaldandi útbúgving og menning av starvsfólkum umráðandi í hesum sambandi.

**Heilsa og trygd**
Felagið leggur stóran dent á heilsu og trygd. Tilgongdin er ein nullhugsjón, har eingin skal koma til skaða undir arbeiðnum hjá og fyri Sev, eins og Sev ikki skal skaða onnur í sambandi við sítt virksemi. Í hesum sambandi hevur felagið neyvt ásettar politikkir og mannagongdir á økinum, millum annað ISO 45001 á Sundsverkinum.

**Umhvørvið**
Sev nýtir tungolju og gassolju í framleiðsluni av elmegi, eins og felagið nýtir fleiri vandamikil evni til reingerð og annað í sambandi við motorarnar. Á umhvørvisøkinum verður stórur dentur lagdur á at fara væl um umhvørvið, og at reglur og krøv á økinum til eina og hvørja tíð verða fylgd. Her kann nevnast, at Sev hevur sett ISO 14001 í verk fyri alt felagið, og at Sev hevur ísett framkomna

roykreinsiútgerð á nýggjastu moturunum í Vági og á Støð 3 á Sundi. Harumframt eru tangagarðar gjørdir rundan um oljutangarnar hjá felagnum kring landið.

## STRATEGISKIR VÁÐAR

Teir strategisku váðarnir eru meira yvirskipað tengdir at, hvussu felagið skipar sítt virksemi, politisk viðurskifti, umdømi o.s.fr. Strategiski váðin skal avmarkast við eini munagóðari virkisætlan. Arbeitt verður við ætlanum at økja tann partin av framleiðsluni, sum byggir á varandi orkukeldur, so sum vatn, vind, sól og sjóvarfall harumframt nýggja stýriskipan og smartgrid-loysnir. Fyri at felagið framhaldandi skal hava gott orð á sær, verður áherðsla løgd á opinleika um virksemið og viðurskifti tess, og felagið tekur undir við skilagóðum broytingum.

**Nýggj tøkni**

Nýggj tøkni (disruption) ger seg galdandi alla tíðina, og fylgir Sev væl við teimum møguleikum og hóttanum, sum eru knýttir at hesum, herundir hvat t.d. vitlíki kann viðføra.

**Verkætlanir**

Sev mennir alla tíðina framleiðslu- og netpartin, og í hesum sambandi verða nógvar verkætlanir framdar. Í hesum sambandi er neyðugt við neyvari stýring, og fyri at stýra størri verkætlanum verða bygginevndir stovnsettar, eins og verkætlanarleiðarar verða knýttir at einstøku verkætlanunum.

**Vitanarstøði og menning**

Útbúgving og menning av starvsfólkum eru lyklaorð í at menna felagið og harvið at avmarka strategiskar váðar.

Felagið leggur stóran dent á, at hóskandi vitan og arbeiðsroyndir eru á øllum økjum í virkseminum í tann mun, hetta verður mett neyðugt, og skipað verður fyri hóskandi eftirútbúgving av starvsfólkunum. Harumframt hevur Sev áhaldandi leiðaraútbúgvingar til leiðararnar fyri betur at stuðla teimum í arbeiðinum hjá Sev.

sev

# Ársfrágreiðing og ársroknskapur 2023

www.sev.fo

# Nýttur roknskaparháttur

Ársroknskapurin fyri Elfelagið Sev er gjørdur í samsvari við ásetingarnar í ársroknskaparlógini fyri stór feløg í flokki C.

Ársroknskapurin er gjørdur eftir sama roknskaparhátti sum undanfarna ár og verður gjørdur í donskum krónum.

Upphæddir í rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu og notum v.m., verða avrundað til heil túsund. Av tí at tølini verða avrundað hvørt fyri seg, kunnu avrundingarmunir vera millum upplýstar samanteljingar og summin av teimum undirliggjandi tølunum.

Har sum talvur í roknskapinum vísa tøl avrundaði til heilar túsund ella millión krónur, og talvan inniheldur samanburðartøl millum ár, víst sum munur í krónum ella prosentum, eru samanburðartølini roknaði upp á undirliggjandi tølini og síðani avrundað. Tískil kann koma fyri, at smærri munir eru millum avrundaðu tølini, sum víst verða í talvuni, og útroknaði samanburðartølini í talvuni.

## Alment um innrokning og virðisáseting

Í rakstrarroknskapinum verða inntøkur innroknaðar, so hvørt tær verða vunnar. Sama er galdandi fyri virðisjavningar av fíggjarligum ognum og skyldum. Í rakstrarroknskapinum verða somuleiðis allir kostnaðir innroknaðir, herímillum avskrivingar, niðurskrivingar, avsettar skyldur og afturføringar sum standast av broyttum roknskaparligum metingum av upphæddum, ið áður hava verið innroknaðar í rakstrarroknskapinum.

Ognir verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá sannlíkt er, at tær í framtíðini geva felagnum fíggjarligar fyrimunir, og virðið av ognini kann ásetast álítandi.

Skyldur verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá sannlíkt er, at tær í framtíðini taka fíggjarligar fyrimunir úr felagnum, og virðið av skylduni kann ásetast álítandi. Við innrokning og virðisáseting verður atlit tikið at væntaðum tapi og váða, ið vísa seg, áðrenn ársfrásøgnin er liðug, og sum viðvíkja viðurskiftum, sum vóru til staðar við roknskaparlok.

## Umrokning av fremmandum gjaldoyra

Handlar í fremmandum gjaldoyra verða umroknaðir til kursin, sum er galdandi á handilsdegnum. Gjaldoyrakursmunir, millum handilsdagin og gjaldsdagin, verða innroknaðir í rakstrarroknskapin sum ein fíggjarpostur.

Áogn, skuld og aðrir peningaligir postar í fremmandum gjaldoyra, sum ikki eru avroknaðir við roknskaparlok, verða umroknaðir til gjaldoyrakursin við roknskaparlok. Munurin millum gjaldoyrakursin við roknskaparlok og kursin, ið var galdandi á upptøkudegnum, verður innroknaður í rakstrarroknskapin undir fíggjarpostum.

## Konsernroknskapurin

Konsernroknskapurin fevnir um móðurfelagið Elfelagið Sev og atknýtt feløg, har Elfelagið Sev beinleiðis ella óbeinleiðis eigur meira enn 50% av atkvøðurættindunum ella á annan hátt hevur avgerandi ávirkan. Fyritøkur, har konsernin eigur millum 20% og 50% av atkvøðurættindunum og hevur týðandi, men ikki avgerandi ávirkan, verða roknaðar sum assosieraðar fyritøkur, sí konsernyvirlitið.

Í konsolideringini verða allar konserninnanhýsis inntøkur og útreiðslur, partabrævaognir, innanhýsis millumverandi og vinningsbýti eliminerað. Somuleiðis verður staðfestur og óstaðfestur vinningur og tap frá handlum millum konsolideraðu feløgini elimineraður.

Kapitalpartar í atknýttum feløgum verða javnaðir við lutfalsliga partinum av handilsvirðinum á nettoognum og skyldum hjá atknýttu feløgunum á útveganardegnum.

## RAKSTRARROKNSKAPURIN

### Nettosøla

Nettosøla verður innroknað í rakstrarroknskapin, um veiting og váði eru farin til keypara innan roknskaparlok, og inntøkan er álítandi uppgjørd og væntast at koma inn. Nettosølan verður innroknað uttan meirvirðisgjald, avgjøld og eftir at avsláttur í samband við søluna er frádrigin.

### Vørunýtsla

Vørunýtsla umfatar kostnaðir til keyp av rávørum og hjálpartilfari frádrigið avsláttur og goymslubroyting í árinum.

### Aðrir uttanhýsis kostnaðir

Aðrir uttanhýsis kostnaðir umfata keyp av olju, tilfari og øðrum tænastuveitingum umframt annan fyrisitingarkostnað.

### Skipanarberandi tænastur

Samlaði kostnaðurin hjá elverkunum kemur av kostnaðinum í sambandi við at framleiða elmegi, umframt kostnaðin fyri veitan av skipanarberandi tænastum. Skipanarberandi tænastur umfata tilrættislegging og stýring av tøkum mátti, rullandi mátti, reaktivum mátti, spenningsregulering og frekvensregulering.

Íkastið til kostnaðin fyri skipanarberandi tænastur kring landið annars er grundaður á kostnaðin hjá smáverkunum.

### Stýring av elskipanini

Kostnaðurin fyri stýringina av elskipanini í meginøkinum er uppgjørdur sum samlaður kostnaður fyri tilfar, lønir og avskrivingar á Kontrollrúminum við Landavegin í Tórshavn. Kostnaðurin fyri stýringina av elskipanini í Suðuroy verður gjørdur upp grundað á lønirnar á Vágsverkinum.

### Býti av inntøkum

Sambært elveitingarlógini skal netvirksemið fíggjarliga hvíla í sær sjálvum soleiðis, at inntøkurnar eru hóskandi til at gjalda fyri rakstur og ætlaðar neyðugar íløgur.

Fyri netpartin merkir hetta, at hesin skal hava eina inntøku svarandi til tær útreiðslur netparturin hevur soleiðis, at netparturin kann gjalda fyri raksturin umframt, at netparturin skal hava inntøkur til at kunna rinda fyri ætlaðar neyðugar íløgur. Inntøkurnar fyri neyðugu íløgurnar taka støði í kravinum til eginfígging.

Tá farið verður undir at gera íløgur, er neyðugt at hava eina ávísa eginfígging soleiðis, at ikki øll íløgan skal fíggast við lántøku. Sev hevur upprunaliga mett, at ein eginfígging upp á 25% er nøktandi, og hevur í roknskapunum fyri 2016-2020 tikið hædd fyri hesum kravinum í roknskapinum fyri framleiðslupartin og netpartin. Kravið til støddina av eginfíggingini tekur støði í íløgunum á fíggjarætlanini fyri framleiðslupartin og netpartin. Hetta er grundað á, at felagið higartil hevur havt ein høgan eginpeningspart.

Kravið til støddina av eginfíggingini tekur støði í íløgunum á fíggjarætlanini fyri framleiðslupartin og netpartin fyri eitt 5-ára tíðarskeið, sum er inniverandi ár og næstu 4 árini. Eginfíggingin fyri inniverandi ár verður roknað soleiðis: peningastreymurin frá rakstur minus kostnað til rentur og avdrátt sett í mun til kravið fyri eginfígging av árligu miðalíløgum næstu 5 árini.

Fyri netpartin merkir hetta, at ársúrslitið verður tillagað soleiðis, at yvirskotið er svarandi til tær útreiðslur, netparturin hevur, umframt eina eginfígging í løtuni upp á 25% av árligu miðalíløgunum næstu 5 árini fyri netpartin. Um samlaða úrslitið fyri samtakið er størri enn úrslitið fyri netpartin, verður hesin partur av úrslitinum fluttur til framleiðslupartin.

Inntøkur hjá framleiðsluverkum eru ásettar at samsvara við samlaða kostnaðin hjá elverkunum, umframt at ein vinningur av framleiðsluni av primo eginognini er innroknaður. Roknaði vinningurin er ásettur við støði í avkasti av langfreistaðum realkredittlánsbrøvum og virðisrøkt av ognum hjá framleiðslupartinum.

### Starvsfólkakostnaðir
Starvsfólkakostnaðir umfata løn íroknað frítíðarløn og eftirløn umframt onnur sosial gjøld. Í starvsfólkakostnaðum verða móttikin endurgjøld frá almennum myndugleikum trekt frá.

### Av- og niðurskrivingar
Av- og niðurskrivingar umfata av- og niðurskrivingar í árinum av immateriellari og materiellari støðisogn.

### Fíggjarpostar
Fíggjarligir postar umfata rentuinntøkur og kostnaðir umframt staðfestan og óstaðfestan kursvinning og tap viðvíkjandi fíggjarligum ognum og skyldum. Fíggjarligar inntøkur og kostnaðir verða innroknað í rakstrarroknskapin við teimum upphæddum, sum viðvíkja roknskaparárinum.

Vinningsbýti frá kapitalpørtum í assosieraðum feløgum verður inntøkuført í tí roknskaparári, sum vinningsbýtið verður samtykt.

Rentukostnaðir og aðrir kostnaðir av lánum til at fíggja framleiðslu av immateriellari og materiellari støðisogn, og sum viðvíkja framleiðslutíðarskeiðinum, verða ikki innroknaðir í útveganarvirðið av støðisognini.

### Inntøkur av kapitalpørtum í atknýttum feløgum
Í rakstrarroknskapi móðurfelagsins verður tann lutfalsligi parturin av úrslitinum eftir skatt hjá atknýtta felagnum innroknaður eftir eliminering av innanhýsis vinningi ella tapi.

### Skattur av ársúrslitinum
Skattur í árinum, ið er partafelagsskatturin fyri árið og broytingin í útsettum skatti, verður innroknaður í rakstrarroknskapinum við tí parti, sum viðvíkur ársúrslitinum. Skattur viðvíkjandi møguligum bókingum beinleiðis á eginognina verður bókaður á eginognina.

## FÍGGJARSTØÐAN

### Materiell støðisogn
Materiell støðisogn verður virðisásett til útveganarvirði, frádrigið samlaðar avskrivingar og niðurskrivingar. Grundøki verða ikki avskrivað.

Avskrivingargrundarlagið umfatar útveganarvirðið við frádrátti av væntaðum restvirði eftir lokna brúkstíð.

Útveganarvirðið umfatar keypsprísin og kostnaðir, ið beinleiðis eru knýttir at útveganini, til ognin er klár at taka í nýtslu.

Avskrivað verður javnt yvir væntaðu brúkstíðirnar og restvirðunum hjá ognunum:

| | Brúkstíð ár | Restvirði |
|---|---|---|
| Framleiðslu og býtisvirkir | 10-50 | 0% |
| Bygningar | 50 | 0% |
| Rakstrargøgn | 3-5 | 0% |

Smáamboð við eini væntaðari livitíð á undir 1 ár verða útreiðsluførd í útveganarárinum.

Viðvíkjandi eginframleiddum ognum fevnir útveganarvirðið um kostnaðir av tilfari, lutum, undirveitarum, beinleiðis lønarkostnaði og óbeinleiðis framleiðslukostnaði.

### Niðurskriving av støðisogn
Hvørt ár verða roknskaparligu virðini á materiellari støðisogn mett fyri at fáa ábending um, hvørt tey eru minkað í virði. Hetta kemur aftrat vanligu avskrivingini.

Eru ábendingar um virðisminking, verður ein niðurskrivingarroynd gjørd av hvørji einstakari ogn ella ognarbólki. Niðurskrivað verður til endurvinningarvirðið, um hetta er lægri enn roknskaparliga virðið.

Sum endurvinningarvirði verður hægra virðið av nettosøluprísi og kapitalvirði nýtt. Kapitalvirðið verður uppgjørt sum nútíðarvirði av væntaðum nettoinntøkum frá nýtsluni av ognini ella ognarbólkinum.

### Kapitalpartar í atknýttum feløgum
Kapitalpartar í atknýttum feløgum verða innroknaðir í fíggjarstøðuna við lutfalsliga partinum av roknskaparliga innara virðinum hjá feløgunum. Innara virðið verður uppgjørt eftir roknskaparháttinum hjá móðurfelagnum, eftir at hædd er tikin fyri óásannaðum konserninnanhýsis vinningi og tapi, umframt frádrátti ella ískoyti av positivum ella negativum goodwill uppgjørt eftir yvirtøkuháttinum.

Nettouppskriving av kapitalpørtum í atknýttum feløgum verður skrásett undir eginognini í tiltaksgrunninum fyri nettouppskriving eftir innanvirðisháttinum, í tann mun roknskaparliga virðið er hægri enn útveganarvirðið.

Vinningsbýti frá atknýttum feløgum, ið kann væntast at vera samtykt, áðrenn hendan ársfrásøgnin verður góðkend, verður ikki bundið í innanvirðisgrunninum. Tiltaksgrunnurin verður javnaður við øðrum rørslum í eginognini í atknýttum feløgum.

Keypt ella nýstovnað feløg verða í ársfrásøgnini innroknað frá útveganardegnum. Seld ella avtikin feløg verða innroknað fram til avhendingardagin.

## Kapitalpartar í assosieraðum feløgum

Kapitalpartar í assosieraðum feløgum verða virðisásettir til útveganarvirði. Er nettorealisatiónsvirðið lægri enn útveganarvirðið, verður niðurskrivað til lægra virðið.

## Vørugoymslur

Vørugoymslur verða virðisásettar til útveganarvirði eftir FIFOháttinum. Um nettorealisatiónsvirðið av vørugoymslunum er lægri enn útveganarvirðið, verður niðurskrivað til lægra virðið.

Útveganarvirðið á handilsvørum umframt rávørum og øðrum hjálpartilfari umfatar keypsprís umframt flutningsgjald.

Útveganarvirðið av framleiddum liðugvørum og vørum í gerð umfatar útveganarvirði av rávørum, hjálpartilfari, beinleiðis lønarkostnaðum og óbeinleiðis framleiðslukostnaðum. Óbeinleiðis framleiðslukostnaðir umfata óbeinleiðis tilfar og løn umframt viðlíkahald og avskrivingar av maskinum, virkisbygningum og útgerð, ið verður nýtt í framleiðsluni. Harumframt umfatar posturin kostnaðir til at leiða og fyrisita framleiðsluna, umframt ognarførdan menningarkostnað, ið viðvíkur vøruni.

## Áogn

Áogn verður virðisásett til amortiserað útveganarvirði, sum vanliga svarar til áljóðandi virði. Fyri at standa ímóti møguligum tapi verður niðurskrivað til nettorealisatiónsvirðið.

## Tíðaravmarkingar

Tíðaravmarkingar, sum eru innroknaðar undir ogn, umfata staðfestar kostnaðir, sum viðvíkja komandi roknskaparári.

## Tøkur peningur

Tøkur peningur umfatar tøkan pening og stuttfreistaði virðisbrøv, við einari lánitíð á 3 mánaðir sum uttan forðingar kunnu umsetast til tøkan pening, og har tað bara er ótýðandi váði fyri virðisbroytingum.

## Partafelagsskattur og útsettur skattur

Skyldugur skattur og skattaáogn verða innroknað í fíggjarstøðuna við teirri upphædd, sum kann útroknast av skattskyldugu inntøkuni fyri árið, javnað fyri skatt frá undanfarnum árum. Skyldugur skattur og skattaáogn verða víst mótroknað í tann mun, at hetta er í samsvari við lógina, og at postarnir væntandi verða avroknaðir netto ella samstundis.

Útsettur skattur verður roknaður av øllum viðkomandi tíðarbundnum munum millum roknskaparlig og skattlig virðir av ognum og skyldum. Hetta verður uppgjørt við støði í ætlaðu nýtsluni av ognini, ella hvussu skyldan ætlandi verður afturgoldin.

Útsett skattaáogn herímillum skattliga virðið á framflytingarheimilaðum skattligum hallum verður innroknað við tí virði, sum ognin væntandi verður realiserað fyri antin við at javna í skatti av framtíðarinntøkum ella við at mótrokna útsetta skattaskyldu innan fyri somu løgfrøðiligu skattaeind. Møgulig útsett nettoskattaáogn verður tikin við til nettorealisatiónsvirðið.

